Síða 3

# FFblaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA

Nr. 378 Hósdagur 9. november 2006 15,-



## Bók um Jóan Petur hjá Mouritsi

Minnisvarði settur einum av okkara bestu fiskimonnum.

Sveisi- og trygdarútgerð til skip




P/f Sveisingahandilin
Mykinesgøta 8
Boks 18
FO-110 Tórshavn
Tel 311909 – fax 311509
E-mail: sveising@post.olivant.fo



Ísrael hevur best hugsandi fiskiveiðiskipanina.

Síða 6

# Fiskidagaskipanin í Ísrael



## Vitjan í Betlehem

Á Blindaheiminum eru kristin og muslimar vinir.

Síða 11

Síða 4

# Visjónin eingin vil vita av




KÄRCHER



Vit eru einaumboð fyri KÄRCHER trýstspularum til ídnað.



Vit umvæla eisini

TÓRSHAVNAR MASKINHANDIL
v/Tummas Andreasen · Varðagøta 29-30
FO-100 Tórshavn · Tlf. 31 34 42

## Føroya Fiskimannafelag 95 ár

FF hálvrundan føðingardag í komandi viku

Síða 20

**FF blaðið**
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA

**FF-blaðið:** Bryggjubakki
postsmoga 58, FO-110 Tórshavn
tlf: 311569 · fax: 318769
teldupostur: ff-blad@post.olivant.fo
heimasíða: www.fiskimannafelag.fo
**Útgevari:** Føroya Fiskimannafelag

**Blaðstjóri:** Óli Jacobsen
**Layout:** Føroya Fiskimannafelag
**Prenttilgerð:** Føroya Fiskimannafelag
**Prent:** Prentmiðstøðin

**Loyvt er at endurprenta og endurgeva tilfar úr blaðnum, tá keldan er uppgivin**
**- kemur út annan-hvønn hósdag**




**100% tryggleika?**





**Tí velja fleiri og fleiri maskinmeistarar Mobil smyrjiolju!**

petur & petur • 320870

**Mobil Oil Føroyar**

Mobil Oil Føroyar
Mykinesgøta 8, Boks 18
FO-110 Tórshavn
Tel 319354 – fax 311509
E-mail: sveising@post.olivant.fo

www.fiskimannafelag.fo




# STÝRIMAÐUR TIL NORRÖNU

## Vilt tú verða í fyrstu røð í føroyskari skipa- og ferðavinnu?

Smyril Line søkir eftir 1. stýrimanni til Norrönu. Vit bjóða honum/henni eitt spennandi starv umborð á flaggskipinum í føroysku ferðavinnuni. Starvið er avbjóðandi og fjølbroytt, og tú fært ein góðan møguleika at verða við í framhaldandi menningini av Norrönu og Smyril Line – og harvið føroysku ferðavinnuni.

Títt komandi arbeiðspláss er eitt av størstu, bestu og nýggjastu skipum á Norðuratlantshavinum, og samstundis størsta skip føroyingar eiga. Hon tekur 1482 ferðafólk, 800 bilar og manningin, tá hon er mest, telur heili 118 fólk. Aftrat góðum starvstreytum bjóða vit hartil eina áhugaverda siglingarætlan, góða løn og góða frítíðaravtalu.

**Førleikakrøv til 1. stýrimann:**
- Skipsføraraútbúgving við minimum STCW áteknað vinnubræv sum stýrimaður av 1. stigi
- STCW áteknað GMDSS, GOC prógv
- Heilsu-, sløkkileiðara-, roykkavara-, trygdar-, Crowd Management-, bjargingar- og onnur bjargingar/førleika prógv
- Arbeiða sjálvstøðugt og góð samstarvsevnir.

**Setanartreytir**
Setanartreytir sambært sáttmála millum Skipara – og Navigatørfelagið og Reiðarafelagið.

Vit hugsa okkum, at tú hevur royndir frá ferðamannaskipum áður, men hetta er eingin treyt.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til:

**SMYRIL LINE**
Financial Controller
M/F Norröna
P.O Box 370
FO-110 Tórshavn

Umsøknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 8. november 2006 kl. 12.00.

Nærmari upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jørmund Vágadal á:
+298 34 49 92 ella
controller@norrona.fo

Smyril Line varð stovnað í 1982, og er í dag ein altjóða fyritøka við skrivstovum í Føroyar, Ísland, Noreg, Hetland, Skotland og Danmark um allan heimin. Umframt egnar skrivstovur, so hevur felagið eisini samstarvsfelagar í meginparinum av europeiska meginlandinum og restini av útheiminum.

SMYRIL LINE · J. BRONCKS GØTA 37 · POSTBOKS 370 · FO-110 TÓRSHAVN
TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO · WWW.SMYRIL-LINE.COM

## Jóan Petur hjá Mouritsi:

# Enn ein fiskimannasøga



Í komandi viku kemur út bókin "Jóan Petur hjá Mouritsi", sum er skrivað av Absalon Absalonsen, sum eins og Jóan Petur er ættaður úr Vági.

Hendan bókin er enn eitt vælkomið íkast til okkara fiskimanna- og fiskivinnusøgu. Umframt at vera ein søga um Jóan Petur, er bókin eisini ein skipasøga serliga fyri Vág. Her ein hópur av upplýsingum um ymisk skip, og hvussu tey hava fiskað í mun til onnur, og eisini ein hópur av manningarlistum.

Sumt av hesum kann virka eitt sindur trivielt, men tað er sera hent at eftirtíðin kann vita, at júst her finnast hesir upplýsingar, tá brúk er fyri teimum. Tað sama er við øllum myndunum í bókini. Annars umrøður bókin 734 persónar og 155 skip og bátar.

Jóan Petur var føddur í Vági í 1894, og hann doyði umborð á Saksaberg í 1963. Hetta minnist eg sjálvur væl, hóast eg tá einki visti um Jóan Petur. Eg róði út í Sukurtoppinum um hesa tíðina, og onkursvegna eru deyðsboðini komin á ein slíkan hátt, at tey framvegis standa í minninum.

Søgan um Jóan Petur er ein "klassisk" søga um dreingin, sum ikki dugdi so væl í skúlanum, men sum gjørdist rokskipari, sum enn verður tikin til. Hann fer enntá til skips 12 ára gamal, og lovar at lesa uppá á túrinum, men hesum mundi neyvan koma nakað burtur úr. Hann kom aftur í skúla, men tá hann var 14 ár, fór hann sum allir aðrir til skips. Næsta stigið var at fáa skiparaprógv og hetta fekk hann í 1916.

### Søktur fyrsta túrin sum skipari

Fyrsti skiparakjansurin var við "Margrethu" í 1917. Hann fekk eina sera ógvuliga byrjan, tí "Margretha" var eitt av skipunum, sum varð søkt á bankanum av týskum kavbátum. Hesum greiðir Absalon eisini frá. Men vit fara at loyva okkum at endurgeva ta frásøgn um hesa hending, sum vit fingu frá Halldór Olafsson í 2002, og kann hetta eisini vera eitt lítið minni um Halldór, sum doyði fyrr í ár.

Hann greiddi soleiðis frá:

"Tað, sum hendi hendan dagin mikumorgunin 23. mai 1917, var, at "Margrete" lá á bankanum. Jóan Petur hjá Mouritsi úr Vági, var skipari, og var hetta hansara fyrsti túrur sum skipari. Dýrdarveður var, báturin var settur út og skiparin, saman við Viktorinus av Viðareiði, var farin í bátin at skjóta fugl til agn. Tá raktu teir við nakað uppi í lu. Í fyrstuni hildu teir tað vera ein motorbát, men skjótt var gátan gitt. Ein kavbátur stýrdi beint móti skipinum. Komnir nær, skutu teir við maskinkanón nøkur skot í sjógvin beint frammanfyri skipið. Nú veittraðu teir manningina at borði. Fýra mans fara í bátin og rógva at kavbátinum. Her fáa teir boð um, at øll manningin skal fara í bátin.

Teir bóðu týskararnar um náði, tí báturin, teir høvdu, kundi als ikki rúma allari manningini. Men týski ovastin var so "beinasamur" at bjóða sær at koma umborð og skjóta teir, sum lupu av!

Halldór greiddi eisini frá, at á einum møti í brøðrasamkomuni í Vági, har evnið var bøn, hevði Karl Hansen úr Eiðsvík á Viðareiði orðið. Tað skal sigast, at Karl var ein tann fyrsti í brøðrasamkomuni á Viðareiði. Hann hevði verið við "Margrethe" hendan túrin. Hann var verfaðir skiparan Jóan Petur, og hann var elsti maður um borð.

Karl greiddi frá, at tá hann sá "djórið," gjørdist hann so skakkur, at hann slepti snørinum. Og hann gjørdi ikki vandari enn, at hann blakaði seg niður á dekkið at biðja Gud um bjarging. Hann roknaði við, at skipið kom at farast. Men hann visti, at báturin teir høvdu, var so lítil, at her rúmaðist ikki øll manningin, so tað var ringt at ímynda sær at øll manningin kundi sleppa undan við lívinum.

Og tá farast skuldi í bátin, noktaði Karl at fara við. Hann helt, at hann var so mikið gamal, at hann skuldi ikki minka um møguleikan hjá hinum, og hann var í hvussu er klárur at fara. Men teir noyddu hann umborð.

### Bjargaðir av dreymi

Søgan endaði ikki her:

Men tað mest einastandandi í hesi søgu er eftir. Júst um sama mundið var "Sunbeam" staddur vestanfyri Suðuroynna. Skipari var Gunnar Danielsen, sum varð ein sera kendur skipari. Hann var annars eisini verfaðir Halldórs.

Men Gunnar ger av at fara út á bankan. Hann setir kós, sum hann gevur róðursmanninum boð um at stýra eftir, og so tørnar Gunnar inn. Men knappliga verður Gunnar vaktur av einum manni, sum gevur honum eina nýggja ítøkiliga kós at stýra eftir. Gunnar fer upp og gevur róðursmanninum ta nýggju kósini. Og hetta gjørdi, at "Sunbeam" kom beint á søkkladna bátin og fekk bjargað manningini, og fór til lands við henni. Um náttina var fitt gul, og ilt er at siga, hvussu tann søkkladni báturin hevði klárað seg. Men morgunin eftir lógu teir dygst undir sørvágsbjørgunum. Tá kom ein motorbátur og sleipaði teir inn á Sørvág.

Karl ivaðist í taluni ikki um, at "maðurin", sum gav boð um at broyta kósina, var sjálvur Harrin, og at her var talan um eitt ítøkiligt bønarsvar.

### Søgan um kúnna

Bókin er 386 síður við einum hópi av myndum. Tað er sera avmarkað, hvussu nógv ið kann takast við í einum ummæli sum hesum. Tað er hugtakandi at lesa um, hvussu tað lá fyri hjá Jóan Peturi altíð at fáa tosk, sum tá hann í 1928 fer úr góðum fiskiskapi í Íslandi til rokfiskiskap í Grønlandi, sum tá framvegis var rættiliga ókend leið hjá føroyingum.

Her skal burtur úr bókini takast onkur serlig hending. Ein sera stuttlig søga er, tá Jóan Petur kom heim úr Íslandi við eini kúgv.

Tá var hann við "Heimdal". Tá tað nærkast heimferðini, fara teir inn á Skála við Langanes at vitja ein bónda. Her fekk Jóan Petur góðan hug á eini kúgv hjá bóndanum. Men hvussu skuldi hon fáast heim? Jú, skipið var ikki heilt fult, so teir tømdu tvær krubbur og koyrdu kúnna í lastina. Hoyggj høvdu teir við sær, og kúgvin varð mjólkað morgin og kvøld á vegnum heim eins og sópað varð undan henni.

Eitt sindur av skili var í heimligu myndugleikunum. Djóralæknin noktaði nevniliga kúnni í land, áðrenn hon hevði verið í karantenu. So Jóan Petur og Marin, kona hansara, máttu rógva umborð fleiri ferðir um dagin at mjólka, sópa og geva. Men at enda slapp kúgvin í land, og hon royndist sera væl.

### Søgan um Frank

Ein onnur hugtakandi søga er um Frank. Hana hevur Absalon frá havnameistaranum í Vági, Martin Andreassen. Hann lá í 1957 inni í Leith við "Høgafossi". Tá kemur ein fremmandur maður umborð, sum tosar eitt sindur av føroyskum. Tá hann hoyrir, at Martin er vágbingur, biðjur hann Martin heilsa navngivnum bygdamonnum frá Frank. Tað ger hann so, og teir hvøkka við og spyrja um Frank livir enn. Tá fekk Martin søguna.

Tá teir í 1929 vóru í Frankaríki eftir "Yvonnu" kemur ein 14 ára gamal pólskur drongur umborð. Teir skilja, at hann hevur ongastaðni at vera, og teir taka sær av honum. Tá farast skuldi til Føroya, avráða teir at taka drongin heim við. Her var hann í fleiri ár, har hann sigldi við ymiskum skipum, inntil hann fór avstað aftur. Í Vági frættu tey frá honum fram til kríggið, men aftaná frættist einki, so tað kundi alt vera hent. Men so fingu tey hetta seinasta lívsteknið frá honum í 1957.

Tað var annars við "Yvonnu", at Jóan Petur rættiliga kom at standa sína roynd sum rokskipari. Í 1931 fingu teir 107.000 fiskar, og Absalon heldur, at hetta er størsti snøristúrur, nakað føroyskt skip hevur gjørt. Hetta árið høvdu teir 3.026 skippund, og er hetta størsta nøgd, nakað snørisskip hevur fiskað í einum ári. Hesi tøl eru ikki komin fram av ávunum hjá Jóan Petur. Hann var eingin reypari, so aðrir hava funnið tølini fram, og hetta sigur eisini nakað um mannin.



*Absalon Absalonsen inni á FF.*

### Eisini um Mourits

Tað er eisini eitt pluss fyri hesa bók, at Absalon hevur ein kapittul um Mourits hjá Jóan Petur, sum eisini hevur verið ein týdningarmikil kelda til bókini. Mourits er um 85 ár, og hann hevur havt nakað somu lívsleið sum pápin.

Vit, sum enn eru í hampiligum aldri, minnast Mourits sum skipara á "Gamla Andrass", sum hann førdi í 12 ár. "Gamli Andrass" var ein av teimum mongu línubátunum, sum komu til landið frá 1956 og fram í 60-ini, og er Mourits tí eisini partur av línubátasøguni. Kokkadrongur fyrsta túrin, tá teir mynstraðu 18. august 1960 var Óli Hammer! Tað gekk eisini væl við fiskarínum hesi árini, og hann hevði stórt sæð fólkið øll árini. Sjálvur var hann bert av í tveir túrar.

Beiggi Jóan Petur, Dánjal, hevur eisini fingið serstaka umrøðu í bókini, og felags fyri teir allar kann sigast, at teir hava verið brandar.

Nú ber ikki til at gera meira burtur úr hesum ummæli, men vit vilja geva bókina okkara besta viðmæli.

FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA



## Rættindini hjá borgaranum:

# Visjónin eingin vil vita av

Sum vit hava greitt frá fyrr, halda vit, at tað er eitt átrokandi øki, sum er útihýst úr visjónsætlanunum hjá løgmanni. Hetta eru rættindini hjá borgaranum í samfelagnum.

Vit settu í vár fram uppskot um at seta ein serligan visjónsbólk, sum kundi kanna, um tað er tørvur á at taka nøkur stig at bøta um rættartrygdina hjá borgarunum, men hetta hevur verið avvíst av løgmanni sjálvum, sum tykist at halda, at her er einki at fara eftir.

Vit halda tó, at tað er ein grundleggjandi tørvandi rættarfatan í Føroyum, og hetta hevur verið lýst við einum hópi av undirbygdum og dokumenteraðum greinum.

Okkara greiða fatan er, at støðan hevur ongantíð verið so ring sum nú. Vit kunnu staðfesta, at tað “besta” dømi um, hvussu vánalig rættindini eru hjá borgarunum, hava vit upplivað í ár.

Her verður víst til tað skattamál, sum vit hava umrøtt í fleiri greinum, og vilja vit enn einaferð útgreina, hvussu vit sum umboð fyri borgaran hava upplivað hesa málsviðgerð við fylgjandi kærunevndarviðgerð.

### Talan er um skipanina, sum hevur feilin

Her skal undirstrikast, at her ikki talan um eitt mál, sum viðvíkir einstaklingum í umsitingini. Hetta mál hevur í 10 ár gingið gjøgnum so nógvar hendur, at tað lýsir sjálva ta umsitingarligu og politisku skipanina sum heild.

Hesa ferð avmarka vit lýsingina til ein lítlan part av málinum, sum má metast at vera ein fullgóð lýsing av, hvussu skipanin virkar í síni heild.

### Borgarin er altíð mótpartur

Okkara avgjørda fatan er, at myndugleikin metir borgaran fyri at vera mótpart uttan mun til, um hansara sjónarmið eru røtt ella skeiv, ella um tey eru órímilig ella rímilig. Sum víst á í seinasta blaði verður arbeitt beint í stríð við ta mannagongd, sum er fyriskipað einum rættarsamfelag sum tí danska á tilsvarandi økjum.

Trygdin hjá borgaranum skuldi verið alment ásetta kæruskipanin. Hon er í tveimum stigum. Fyrst ein kommunal kærunevnd, hvørs avgerð síðan kann kærast til eina landskærunevnd.

Fyrst skal sigast, at kommunala kærunevndin kann bert kallast spill av orku og tíð. Tann, sum tapir í hesum stigi, fer uttan víðari til landskærunevndina, sum á pappírinum er væl mannað av løg- og øðrum frøðingum.

Tað eru royndirnar av hesi nevnd, vit lýsa her. Eftir okkara fatan gevur hennara arbeiðslag ikki á nakran hátt borgaranum tryggleika fyri, at hennara viðgerð veruliga gevur eitt rætt úrslit. Tað er púra greitt, at bæði hjá Toll og Skatt og hjá Kærunevndini verður eitthvørt veruligt ella uppfunnið ivamál snarað til skaða fyri borgaran.

Sum víst á í ítøkiligu málslýsingini setur nevndin als ikki nakað sum helst krav hvørki til Toll og Skatt ella til sín sjálvs. Tað verður ikki kravt so frægt sum at sannleikin liggur á borðinum, tá mál verða avgreidd. Hetta krav setur hon heldur ikki til sín sjálvs, og úrslitið er sjálvtsagt eisini hareftir.

### Borgarin einki krav um frágreiðing

Tað sermerkta við almennu umsitingini er, at borgarin ikki skal hava nakað krav um frágreiðing. Hetta er serstakliga komið fram í niðurstøðunum hjá skattakærunevndini. Hóast vit bæði í brøvum til nevndina og alment hava víst á, at ósamvar í teirra niðurstøðum, so fáa vit ikki svar.

Vit hava t.d. víst á, at nevndin fyrst biður Toll og Skatt um ávísar upplýsingar. Tá nevndin fær hesar upplýsingar frá FF, eftir at Toll og Skatt hevur noktað at geva teir, nú hava teir ongan týdning fyri málið. Men frágreiðing fyri hesi kúvending fæst ikki.

Hugburðurin tykist at vera tann sama sum hjá drusunum í Miðeystri og teirra religión. Tað einasta, sum fólkið fær at vita er, at verfaðir Móses, Jethro, er teirra profetur. Restina av teimum 111 lærusetninginum er tað bert prestaskapurin, sum kennir. Og tá fólkið kortini ikki skilir teir, er heldur eingin grund til at greiða teimum frá, hvat tað er, sum teir skulu trúgva.

Hetta tykist eisini at vera grundsetningurin hjá teirri “akademisku prestastætt”, sum meira og meira hevur tikið ræðið í Føroyum. Teirra sjálvgjørdu lærusetningar skulu gerast so torskildir, at eingin skal skilja teir og enn minni kunna seta seg ímóti teimum.

Og hetta gongur. Eru spurningar, sum ikki kunnu svarast, so skal tann, sum spyr, bert tigast í hel. Men vit fara ikki at lata okkum tiga í hel. Tað virkar eisini í allarflestu førum. Men ikki hjá mótvegis FF. Um Turið Debes Hentze, formaður í landsskattanevndini, ikki hevur vitað tað fyrr, so kemur hon at sanna tað nú.

### Borgarin ongan kjans

Við hesi skipan hevur borgarin ongan møguleika. Hevur hann eitt mál, har hann metir seg órættvíst viðfarnan, skal hann fyrst í holt við Toll og Skatt. Tað er einsamalt meira møði enn føði. Síðan skal hann gjøgnum tvinnar kærunevndir, sum taka fleiri ár, har tað er borgarin sjálvur, sum hevur próvbyrðuna og ikki tann myndugleikin, sum ger seg inn á borgaran.

Hetta krevur tol, kreftir og pening, tí uttan ein advokat ella grannskoðara er møguleikin eingin at fáa nakra sømdir. Hann skal eisini gjaldast, sjálvt um viðkomandi skuldi fingið viðhald.

Við okkara royndum er møguleiki fyri at fáa viðhald sera avmarkaður. Tá er danska rættarskipanin eftir, sum eisini tekur ár.

Men tá er “Per Hansen í Dali” fyri langari tíð síðani fyrilagstur og hevur givið upp.

### Opin fyrispurningur til løgmann

Okkara royndir í umrødda máli eru sera væl útgreinaðar í blaðnum og á okkara heimasíðu: www.-fiskimannafelag.fo

Vit hava eisini kunnað løgmann um okkara royndir í hesum máli, og hava frá hansara umsiting fingið eitt svar, sum bendir á, at hann ikki skilir álvarsemið á málinum.

Vit meta júst okkara royndir í hesum máli sum eitt dømi um, at rættindini hjá borgarum er eitt sera viðkomandi øki at taka upp í eini framtíðarætlan fyri føroyska samfelagið.

Vit vilja tískil seta løgmanni fylgjandi opna fyrispurning:

Heldur løgmaður hetta vera mannagongdir, sum borgarin kann kenna seg tryggan við?

*Óli Jacobsen*

# Er hendan rættarfatan í samsvar við henni hjá løgmanni



**Viðvíkjandi kæru til Skatta- og avgjaldskærunevndina avgerð hjá Kommunalu Skattakærunevndini viðvíkjandi [redacted]- tykkara j.nr.[redacted]**

Tykkum kunnugt var omanfyri nevnda mál til viðgerar í Skatta- og avgjaldskærunevndini tann 10. mai 2006. Nevndin tók tó ikki støðu til málið henda dagin, men avgjørdi at útseta málið til innheintingar av nærri upplýsingum um, hvussu siðvenjan viðvíkjandi skatting av fiskimonnum hevur verið.

Í hesum sambandi verður Toll- og Skattstova Føroya biðin um at upplýsa, hvussu fiskimenn við saltfiskabátum vórðu skattaðir. Tit verða vinarliga biðin um at senda umbidnu upplýsingarnar skjótast gjørligt og helst innan 30. mai 2006

Til kunningar og møguligar viðmerkingar verður samstundis sent avrit av skrivi frá Føroya Fiskimannafelag, dagfest 15. mai 2006 við fylgiskjølum.

Avrit av hesum skrivi er sent Føroya Fiskimannafelag og Páll Nielsen, adv.

Vinarliga

Anja Hovgaard, fulltrúi

Her hava vit skjalprógv fyri einum lítlum parti av málsviðgerð hjá Toll og Skattstovu Føroya og hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini.

Aftaná fund tann 10. mai sendir Kærunevndin Toll og Skatt endurgivna brævið.

Hetta er ein sera viðkomandi fyrispurningur, tí okkara høvuðssjónarmið í málinum er definitiónin av skattainntøku hjá fiskimonnum, sum er grundað á siðvenju aftur til 1953 og 40-50 ár fram í tíðina.

Toll og Skatt svarar aftur 29. mai 2006. Men her er eingin upplýsing, sum Kærunevndin hevur biðið um.

### Niðurstøðan í svarinum er henda:

*(Avvarðandi økisdeild hjá Toll og Skatt) heldur enn einaferð fast við, at umsitingin ikki hevur broytt siðvenju, tá talan er um at gera skattskyldugu inntøkuna upp hjá einum sjómanni, har kosturin fer av býttum (t.v.s. av manningarpartinum). Hvat ið er hent afturi í 60'unum …., er ein spurningur, ið vit av góðum grundum ikki vita ella kunnu svara uppá.*

Her er talan um beinleiðis skeiva kunning, sum vit skulu venda aftur til.

Kærunevndin góðkennir, at hon ikki fær teir umbidnu upplýsingar og tekur støðu út frá hesum pástandum hjá Toll og Skatt, sum ikki eru undirbygdir við so mikið sum einum bókstavi.

Hetta kemur m.a. soleiðis fram í avgerðini hjá nevndini:

*Eftir fundin í Skatta- og avgjaldskærunevndini varð Toll- og Skattstova Føroya spurd, hvussu fiskimenn á saltfiskabátum vóru skattaðir. Toll- og Skattstova Føroya svaraði m.a., at tey hava ikki upplýsingar um ávísar skipabólkar, hvussu teir hava verið skattaðir. Toll- og Skattstova Føroya helt fast við, at umsitingin hevði ikki broytt siðvenju, tá talan er um at gera skattskyldugu inntøkuna upp hjá einum sjómanni, har kosturin fer av býttum.*

Vit kundu eftirfylgjandi prógva, at í tí brævi frá Toll og Skatt, sum var svarið uppá umrødda fyrispurning frá Kærunevndini, eru tveir beinleiðis skeivleikar.

Annar er, at siðvenjan ikki er broytt á hesum øki. Vit hava við framløgu av avrokningum gjøgnum 10-tals ár og saman við frágreiðingum um málið kunnað prógvað, hvussu fiskimenn hava verið skattaðir á umrødda øki og og at siðvenjan er broytt.

Toll og Skatt ikki hevur lagt fram so mikið sum eitt skjal sum váttar teirra sjónarmið. Hetta er av teirri einfaldu orsøk, at slíkt finst ikki.

Hin skeivleikin er, at Toll og Skatt ikki skal kunna vita, hvussu menn hava verið skattaðir í 60-unum. Vit hava kunnað prógvað hetta júst við tilfari, sum vit hava fingið frá Toll og Skatt! Tað er júst fyri hetta tíðarskeið, at tað er av týdningi at fáa staðfest siðvenjuna á økinum.

Grundað á, at vit høvdu útvegað teir upplýsingar, sum Kærunevndin uttan úrslit hevði biðið um at fáa frá Toll og Skatt, heittu vit á Kærunevndina um at taka málið uppaftur.

Svarið vit fingu 21. september og hevði hesa niðurstøðu:

*Tá tulkingin og málsviðgerðin hjá Toll- og Skattstovu Føroya í øllum førum síðani miðskeiðis í 90-unum er í samsvar við hesa áskoðan (hjá Toll og Skatt og Kærunevndini), eru nýggju upplýsingarnar frá kæraranum, sum lýsa, hvussu siðvenjan hevur verið fyrr, ikki av týdningi fyri avgerðina.*

Hetta prógvar sakligheitini hjá Kærunevndini. Fyrst biður hon um ávísar upplýsingar frá Toll og Skatt. Tað kann bert vera ein orsøk fyri eini slíkari umbøn, og hon er, at hesir verða mettir at hava týdning fyri viðgerðina.

Tá Toll og Skatt noktar at lata Kærunevndini hesar upplýsingar, við grundgevingum sum einki hald var í, tekur Kærunevndin kortini støðu í málinum m.a. grundað á beinleiðis villleiðing frá Toll og Skatt.

Tá Føroya Fiskimannafelag eftirfylgjandi útvegar Kærunevndini teir upplýsingar, sum Toll og Skatt ikki vildi út við, tekur Kærunevndin ta støðu, at hesir upplýsingar kortini ikki eru av týdningi fyri viðgerðina! Hetta verður gjørt uttan nakra sum helst frágreiðing.

Afturat hesum kemur, at Kærunevndin hevur falsað okkara pástand í málinum og hevur tillagt okkum sjónarmið, sum vit ikki hava, fyri at fáa samsvar niðurstøðuna hjá Kærunevndini.



# Fiskimaðurin skal hava javnbjóðist rættindi við aðrar borgarar í Føroyum

Nú eigur fiskimaðurin at krevja sín rætt sum borgari í Føroyum. Ein uppgerð eigur í stundini at verða gjørd við ALS. Tað, at fiskimaðurin ikki fær úr ALS, eins og aðrir borgarar, er ein skamplettur fyri Føroyar. Hesi síðstu 30 árini hevur man frá almennari síðu og frá ymiskum samfelagsbólkum ført eitt óhunaligt prognom móti tí føroyska fiskimanninum. Hesar lygnir hava viðført, at fólk, ið ikki vita betur, fáa eina skeiva mynd av fiskimanninum. Tey freistast til at trúgva, at fiskimaðurin hevur eitt lív, fylt við marglæti og við yvirstórari inntøku. Soleiðis er tað ikki. At vera fiskimaður er mangan hart og strævið. Tímalønin er lítil og til tíðir fær ein onki. Sannleikin er, at hevur ein verið á sjónum í nøkur ár, so verður ein eisini vitni til mangan sorgarleikin har. Tað nýtist ikki altíð at vera deyðin, sum vitjar umborð, men tað kunnu eitt nú vera skaðar, sum gera, at ein ikki verður tann sami maðurin aftur.

### Teir burturkrógvaðu fiskimennirnir

Í Føroyum, hava vit ein bólk av fólki, sum lítið verður tosað um, og tað eru teir skaddu og meiðslaðu fiskimennirnir. Nakrir av hesum fiskimonnum koma so illa fyri, at teir ikki gerast arbeiðsførir aftur, og missa sostatt inntøkugrundarlagið. Men ein hevur jú tryggjað seg á ymsan hátt, ella tað er í hvussu so er tað, ein fær at vita. Men tað er rættiliga skjótt, at ein verður varur við, at hóast bæði tú sjálvur, og skipið tú siglur við, hava goldið í dýrar dómar, so ført tú lítið ella onki afturgoldið. Í veruleikanum meti eg hatta sum rán, sum tann lóggevandi myndugleikin hevur kroyst oman yvir okkum fiskimenn, fyri at fólk innan hesa "vinnu"? uppá kvamsvís kunnu taka pening fyri eina tænastu, sum ikki verður givin.

Hetta eru teir burturpakkaðu fiskimennirnir. Tað vil siga, at tú lítið og onki hoyrir til hesar syndarligu lagnur. Tað líkar helst nøkrum samfelagsbólkum gott, tí nú gerast hesar syndarligu lagnur ein inntøkukelda fyri tey. Tað vil siga, at skaddir fiskimenn eru eitt tilfeingi hjá teimum. Fyri mær sær tað út til, at tað eisini er ein stórur áhugi millum hesar bólkar, at skaddir fiskimenn ikki fáa høvi at reisa seg aftur. Tað kann vera tí, at tað eru lætt forvunnir pengar, at halda fólki niðri. Um tey fáa høvi at reisa seg aftur, kunnu hesi fólk gerast arbeiðsleys.

### Almennir stovnar forfylgja fiskimonnum

Vit eiga í stundini at gera upp við teir stovnar, sum í langa tíð hava framt ágang móti tí føroyska fiskimanninum. Fyri at taka nakrar "ALS, Tryggingarfelagið Føroyar, Toll og Skatt og Hagstovu Føroya. Vit minnast, jú hvussu skeiv hagtøl, inni á heimasíðuni hjá "Hagstovu Føroya", vóru við til at øsa danir upp móti tí føroyska fiskimanninum. Spurningurin er bara, hvør hatar fiskimannin so nógv, at hann vil svíkja føðilandi Føroyar við at fremja eina sovorðna lygn. Men til alla lukku varð so nógv gjørt av í hesum føri, at lygnin bleiv avdúkað.

*Jan Højgård*
*Mannarættindisstríðsmaður*
*Toftir*

## Bøtt er um tryggingina fyri hættisliga sjúku

Sum kunnugt hevur FF eins og onnur fakfeløg eina trygging fyri hættisliga sjúku. Higartil hava hesar sjúkur verið umfataðar av skipanini:

1. Flestu illkynjaðu krabbameinssjúkur
2. Blóðtøppur í hjartanum
3. Bypass-skurðviðgjørdur/Ballónvíðkan av kranlívæðr í hjartanum
4. Hjartaloku-skurðviðgerð
5. Slag (heilabløðing/blóðtøppur í heilanum)
6. Bjølgar á lívæðrum í heilanum
7. Ávísir góðkynjaðir svullir í heila og mønu
8. Disseminerað sklerosa
9. Amyotrofisk lateralsklerosa (ALS)
10. Vøddasvinn
11. HIV-ígerð, av blóðflutningi ella tengd at arbeiði
12. AIDS
13. Nýrasvignan (bæði nýru)
14. Iutningur av stórum lívgøgnum (hjarta, lunga og livur)

Tann sum fær staðfest eina av hesum sjúkum fær útgoldið eitt skattafrítt endurgjald uppá kr. 75.000.

Nú er henda trygging vorðin meira umfatandi, og er eisini galdandi við miss av sjón og hoyrn og við Creutzfeldt Jacob. Eisini er dekningur fyri krabbameinssjúku víðkaður. Vanliga verður bert goldið eina ferð fyri eina sjúku. Men nú ber til at fáa eina ferð enn fyri krabbamein, um tað eru liðin 7 ár síðan fyrstu ferð sjúkan varð staðfest.

Afturat hesum kunnu foreldur nú eisini fáa fyri endurgjald fyri sjúk børn, men tó bert kr. 50.000.

## Føroya Náttúra:

# Eitt stórverk fyri øll

Í blaðnum í dag verður lýst við bókini Føroya Náttúra, sum kom út fyri kortum.

Vit vilja ikki aftra okkum fyri at geva hesi bók okkara besta ummæli. Meðan so nógv annað verður prentað, sum fólk kunnu vera ymisk á máli um, so hava vit her nakað ítøkiligt, og er tað lýsing av margfeldinum í okkara náttúru, sum flest okkara geva okkum nógv ov lítið far um, og sum er nógv størri enn nakar vanliga hugsar um.

Tað hava nógvar góðar kreftir verið um hesa útgávu, men høvuðsábyrgdina hava Anna Maria Fossaa, Eilif Gaard og Jóannes Dalsgarð havt. Bókin hevur 10 kapittul, har tað hava verið upp til 8 fólk um hvørt teirra. Bókin umfatar tískil øll lið í okkara náttúru.



*Hetta er ein av teimum forvitnisligu myndunum, sum er eitt einfaldað yvirlit yvir føðiketur í havinum.*

Vit fara her at koma inn á tað, sum er nærmast okkara lesarum, nevniliga tað sum hevur við fisk, sjógv og vatn at gera, og fyllir hetta eisini ein stóran part av bókini.

Eitt kapittul eitur "Havið kring Føroyar". Her er umrødd havfrøði, sum ikki er minst aktuel, nú Bogi Hansen hevur fingið virðisløn fyri sítt arbeiði á hesum økinum. Vit fáa at vita um vistskipanir, plankton, fiskar, mannaelvdar ávirkanir á fisk, botndjóralívið, fugl og havsúgdjór, alt økir sum eru av týdningi hjá fiskimonnum. Í bókini sum heild er ein hópur av myndum og talvum, sum lýsa tekstin sera væl. Millum talvurnar viðvíkjandi fiskiskapi, er eisini ein sum vísir (miðal)dýpið, har okkara fiskasløg vanliga halda til, og er hetta millum 60 og 550 metra dýpi. Í hesi talvu eru 44 ymisk fiskasløg. Fyri Føroya Banka er ein onnur talva, sum vísir, at dýpið hjá 35 fiskasløgum er frá 100 til 800 metur.

Eru nógv fiskasløg, so er hetta lítið í mun til øll tey djórasløg, sum liva í havbotninum. Hildið verður, at tey eru ikki færri enn 3.000, sum eru ein mm og longri.

Síðan er eitt kapittul um "Firðir og sund". Her fáa vit eisini at vita um tey djór sum liva her, sum krabbi, krossfiskar og onnur djór, sum tey flestu als ikki kenna navnið á. Nógv verður eisini gjørt burtur úr aling.

Strendur og bjørg fáa vit eisini nógv at vita um, sum t.d. taravøkstur. Tari er ikki bara tari, og her fáa vit eisini ymiskt at vita, sum vit ikki vistu frammanundan.

Síðan er tað um fugl, sum er eitt sera spennandi evni, sum vit eisini onkuntíð hava lýst her í blaðnum. Hildið verður, at 2 mill. pør av sjófugli eigur í Føroyum. Her telur havhestur mest við 600.000 pørum og lómur minst við 25 pørum.

Áir og vøtn hava eisini eitt kapittul, sum ikki er minni áhugavert. Í bókini verður eisini nógv gjørt burturúr gagnnýstlu og hóttanum móti tilfeinginum.

Útgevari er Føroya Skúlabókagrunnur, og er ein slík bók ein sjálvfylgja í skúlanum. Her er nógv tilfar viðvíkjandi sjógv og fisk, sum skúlanum hevur manglað sum frálærutilfar. Tí er tað sera vælkomið.

Men bókin eigur eisini at vera í hvørjum heimi. Hon kann eisini vera ein uppslagsbók, tá spurningar á økinum taka seg upp. Aftast í bókini eru 26 síður við fleiri túsund leitiorðum, so tað liggur væl fyri at finna tað evni, sum brúk er fyri.

FF-blaðið
www.fiskimannafelag.fo

Fiskiskapurin hjá Ísrael:

# Tann ideella fiskiskipanin

**Staddur í Ísrael var tað rímiligt at fara at hyggja at fiskiskapinum har og at vitja fiskimannafelagið í landinum. Vit høvdu eisini tann mest upplagda vegleiðaran, Menakhem Ben Yami, sum eisini hevði fyriskipað vitjanina í Kishon beint við Haifa norðalaga í Ísrael, sum er ein av teimum uppá seg stóru fiskivinnuhavnunum, og har Israeli Fishermen Organisation eisini heldur til.**



*Frá fundinum við fiskimannafelagið. Frá vinstru: Mikhael Zemel, eigur trolara 24 m við 420 hk, Bella Shik, skrivari í fiskimannafelagnum og havfrøðingurin Oz Gofman.*

Tað skal sigast, at fiskiskapur hevur uppá seg lítlan týdning í Ísrael, men tað er kortini áhugavert at síggja, hvussu teir skipa seg.

Tað eru tríggjar aðrar týðandi fiskivinnuhavnir í Ísrael, og eru tær í Akko norðanfyri Haifa, og í Jaffa og Ashdod sunnanfyri. Tað eru umleið 10 trolarar, sum hoyra heima í hvørjari av hesum havnum. Samlaða strandalongdin hjá Ísrael er 230 km, íroknað Gaza, og landgrunnurin út á 200 metra dýpi er 3.250 ferkilometrar.

Við í felagnum eru í dag einir 28 trolarar og umleið 300 smærri fiskibátar, harav eru einir 80, sum veiða á Genesaret-sjónum, har teir eru ein ella tveir mans við hvørjum báti. Nakrir bátar veiða við kraftblokki, og er veiðan hjá teimum úti við 1.000 t árliga tilsamans. Samlaða veiðan hjá Ísrael var fyrr um 4.000 t, men er fallin til 3.000 t árliga, sum øll verður seld innanlands. Lækkingin stavar frá minking í veiðuni eftir sardinum, sum hevur verið hótt av bíligum útlendskum sardinum. Ísrael hevur annars stóran innflutning av fiski, so fiskiskapurin fer allur til heimamarknaðin.

### Søguliga gongdin

Vit hittu fyrst Moshe Raba, sum er fyrrverandi formaður í felagnum. Hann greiddi frá søguni hjá felagnum og umstøðunum hjá fiskimonnum fyrr.

Sum við so nógvum øðrum í Ísrael, so byrjar fiskiveiðusøgan í 1948. Tey, sum tá fluttu til Ísraels, vóru ikki so kunnug við fiskiskap. Nógvir menn vóru yvirlivandi frá holocaust og kendu einki til fiskarí, so teir máttu fáa onkran at læra seg hetta. Hetta varð gjørt við italienskum fiskibátum. Tað fóru nógvir av jødunum við italienarum, og lærdu teir seg harvið eisini at fiska.

Sum frá leið fingu teir so ein fiskiflota, og var hesin lutvíst privat, lutvíst lutafeløg og lutvíst hoyrdu skipini til kibbutsirnar, sum greitt er frá í aðrari grein. Trolarar vórðu keyptir úr Europa, Hollandi og Skotlandi, og einir fimm vórðu bygdir í Ísrael. Trupulleikin er tann, at tað framvegis eru teir somu trolararnir, sum eru her. Teir eru upp til 50 ára gamlir, og alla hesa tíð er bert ein nýbygningur komin til landið, umfram at nakrir trolarar eru skiftir út við yngri, men tó gamlar trolarar. Trolararnir síggja annars út til at vera illa røktir.

Tað verður viðurkent, at tað upprunaliga vóru ov nógvir bátar. Fiskað varð so víða sum gjørligt, men eftir at nakrir bátar vórðu tiknir í turkiskum sjóøki, og manningin varð sett í geglið, máttu teir sleppa hesum leiðum. Tað var annars eisini veitt víða um framvið Afrika-strondini, men fjarfiskiskapurin steðgaði í 1991.

### Høvdu fiskasølu eins og í Føroyum

Felagið kom tá at hava upp til 700 limir. Samstundis hevði fiskiflotin eina fiskasølu, eins og vit høvdu fyrr í Føroyum, og seldi hon fiskin fyri limirnar. Burturav sølugjaldinum fór ein partur sum limagjald til felagið, sum tískil gjørdist fíggjarliga sterkt.

Men har hendi tað sama sum her. Funnið varð fram til, at frægast fekst burturúr, tá menn sjálvir seldu og royndu at fáa sum mest burturúr. Tí fall fiskasølan burtur og harvið inntøkan til felagið.

Hetta hevur so minkað um styrkina hjá felagnum, sum teir eisini hava verið noyddir at umskipa.

### Flotin svarar til tilfeingið

Annars hevur Ísrael ta mest ideellu skipan av fiskiskapinum. Teir hava ein flota, sum fullkomiliga svarar til tilfeingið, sum er til taks. Tað eru 28 trolarar, sum hava fiskiloyvi, og hetta tal liggur fast. Skal eitt nýtt skip fáast inn, skal eitt tilsvarandi skip út úr flotanum. Verður ein trolari seldur, fylgir fiskiloyvið við. Men nøkur endurnýgging hevur tó ikki verið talan um, sum greitt er frá.

Tann einasta avmarkingin er, at fiskast kann ikki á grynri vatni enn 8 favnar, og meskastøddin er hægst 40 mm í Miðalhavinum. Gýtingarøki verða eisini friðað eins og hjá okkum. Annars er fiskimarkið í Miðalhavinum 12 fjórðingar, tí er fitt av altjóða sjógvi. Har eru kvotur í veiðu av tun.

Tað kann eisini verða nevnt, at stuðlað verður uppundir fiskastovnin í Generetsjónum við at seta fiskayngil út, sum so kann styrkja stovnin. Samanumtikið kann sigast, at hesin sjógvur hevur verið eitt gott fiskimið, tá vit vita, at her hevur verið fiskað í minst 2.000 ár.

Teir smærru bátarnir hava annars onga avmarking uttan hana, at teir skulu halda seg til til tann loyvda reiðskapin, sum vanliga er húkur og gørn.

Vanliga eru 4 mans við hvørjum trolara, sum fiskar í Miðalhavinum. Teir eru úti 3 dagar í senn fyri at kunna landa fiskin so feskan sum gjørligt. Fiskimenn eru ikki nakað serliga ortodoksir, tí teir himprast ikki við at fiska leygardag, samstundis sum ortodoksir jødar ikki kunna so frægt sum tendra eina ljóskontakt tann dagin. Skiparin verður løntur við parti av veiðuni, men hinir umborð fasta løn, einar kr. 700 um dagin, um teir eru royndir fiskimenn. Eru teir óroyndir, er lønin minni.

Ein góður trolari fiskar eini 100 tons árliga og prísurin er høgur, tí ársvirðið liggur um góðar 2 mill. kr. Sum tað skilst, er tað trupult at fáa raksturin at hanga saman, ikki minst orsakað av høgu oljuprísunum. Seinasta ár var vánaligt, meðan tað er heldur betri í ár.

Fiskurin hjá trolarunum verður fyri ein stóran part seldur á uppboðssølu, men tað er eisini vanligt, at einstakir bátar hava sínar keyparar, sum teir avtala prísin við. Hetta minnir eisini um skipanina í Føroyum.

### Fiskasløg koma úr Reyða Havinum

Samansetingin av fiskasløgunum, teir veiða, er nógv broytt seinastu árini, og hevur hetta samband við veðurlagsbroytingar, sum ávirka hitan í sjónum. Fiskasløg, sum fyrr bert funnust í Reyða Havinum, eru nú vanlig í eystara partinum av Miðalhavinum. Tey virðismestu fiskasløgini, sum kunnu fáa prísir upp til kr. 120 pr. kg, eru t.d. tunga, "red mullets", og stór rækja. Parturin av hesum fiskasløgum er bert 10-30%, men umboðar 2/3 av virðinum. Tey bíligaru fiskasløgini eru t.d. rossamakrelur, smá rækja, hávur, skøta og ýmisk sløg av serligum Miðalhavsfiski.

### Gaza

Umframt í Ísrael er eisini heilt fitt av fiskiskapi í



*Fiskibátar í Genesaretvatninum. Mynd hjá BenYami.*



*Nótabátur í fiskaríhavnini í Haifa. Mynd hjá Ben-Yami.*



*Yossef (Joseph) Ackermann er ein av teimum polsku jødunum, sum slapp við lívinum undir nasismuni og síðan kom til Ísrael. Hann er nú 83 ára gamal og er givin at fiska. Men nú bøtir hann trol í staðin.*



*Trolaraskipari. Hann er avgjørt ikki ortodoksur, tí hann fiskar leygardag.*



*Sankta Pætursfiskur er týdningarmesti fiskurin í Genesaretsjónum. Her er hann klárur at eta. Minnir nógv um skrubbu í smakki.*

Gaza-geiranum, sum liggur sunnast við Ísraelsku strondina á markinum til Egyptaland. Har er ein hópur av smábátum, sum veiða innan teirra fiskimark, og tað sigst at vera ótrúligt, sum tað kemur burtur úr. Áarmunnin hjá Nilánni má vera sera lívgevandi.

Tað er eisini ein lívligur handil av fiski millum Gaza og Ísrael. Tað vísir seg, at hóast kríggj og fíggindaskap, so er hetta eingin forðing, um tað ber til at gera ein góðan handil.

### Fiskimannafelagið roynir sum frægast

Skrivarin í Fiskimannafelagnum nú er ein kvinna, Bella Shik. Hon er ættað úr Ruslandi. Maður hennara eigur trolara, so hann man vera hollur í ráðum. Felagið roynir sum frægast at verja áhugamálini hjá sínum limum, og verður hetta eisini gjørt mótvegis myndugleikunum. Eitt dømi um hetta er, at á Haifa-økinum er stór dálking frá hernaðarvirkseminum á leiðini. Samstundis hevur verið staðfest, at her vóru lutfalsliga nógvir tilburðir av krabbameini. Tað hevur eydnast einum bólki av sjófólki at fáa endurgjald frá stjórnini fyri hetta, og nú stríðast fiskimenn fyri at fáa somu sømdir. Vit fylgja við, hvussu tað fer at gangast teimum.

Annars var stórur áhugi hjá fiskimonnum, vit møttu, at fáa samstarv við føroyskar fiskimenn. Onkur teirra kundi hugsað sær at sloppið við einum føroyskum ísfiskatrolara fyri at síggja, hvussu vit arbeiða, og vil Føroya Fiskimannafelag sjálvsagt vera til hjálpar.

Tað kann verða nevnt, at teir føroysku trollemmarnir úr Vági eisini eru kendir í Ísrael, og tað verður látið væl at teimum.

### Vitjaðu fiskivinnuumsitingina

Vitjað varð eisini umborð á einum havgranskingarskipi, sum ger nógv burtur úr at kanna umhvørvið og havdjór í eystara parti av Miðalhavinum. Vit vitjaðu eisini fiskivinnuumsitingina í Haifa. Har arbeiða tilsamans 35 fólk, av hesum eru 4 biologar. Í sambandi við teirra kanningar av hvali, kundu teir havt áhuga fyri at fáa ein springara úr Føroyum. Teir vildu enntá senda flogfar eftir einum slíkum, um hann kundi útvegast. Hetta lovaðu vit at kanna fyri teir, og kunnu vit gera teimum ein beina á hesum økinum, eigur tað at verða gjørt.

Samanumtikið kann sigast, at tað var áhugavert at hitta hesi fiskivinnufólkini í Ísrael, og vit vóna at hetta kann skapa meira samband millum londini á hesum øki sum frálíður.

Vit hava útgerðina



Flótitrol | Snurpunótir
Botntrol | Aliútgerð
Rækjutrol | Annað

VÓNIN

Høvuðsskrivstova:
Bakkavegur 22
530 Fuglafjørður
Telefon 474 200
Telefax 474 201

Tórshavn:
Vestara bryggja 12
100 Tórshavn
Telefon 35 43 91
Telefax 31 33 19

info@vonin.com - www.vonin.com




## Eftir einum orði av Guði

"Eftir tínum orði vil eg seta gørnini út aftur." Lukas 5.5

Hendingin var í andsøgn við skilið. Hon minnir um, at vit fóru til útróðrar við snøri um kvøldið, tá ið hinir bátarnir komu at landi. Har hava ivaleyst eisini verið nakrir klókir heilar, sum hava rist við høvdinum og ypt øksl at hesi hendingini. Tá ið til stykkis kom, var tað bara ein einasta orsøk til kortini at gera hetta, og hon var: at Jesus hevði sagt tað. Og so vágaði Símun Pætur sær altso út eftir hesum orði aleina. Hann fekk eisini at kenna, at tað bar.

Hetta kann henda einum og hvørjum av okkum, at tíðir og løtur koma, tá ið vit bara hava Guðs orð at stíga út á. Tað er ímóti øllum menniskjaligum skili, og ráðgevum trýtur ikki við, ið royna at tala okkum frá tí. Men inni í samvitsku okkara merkja vit, at Guð hevur sagt tað. Tá ræður um, at vit tora at stíga út á Guðs orð aleina.

Eydnusælur er tann, ið torir tað! Hann skal kenna, so at hann ongantíð gloymir tað, at hetta Guðs orð á undursaman hátt ber ígjøgnum. Tað kann vera, at hann fær mótburð, og at nakað av hansara egna skrædnar, eins og gørnini gjørdu tað hin dagin á Genesaretvatninum. Men hann fær ríkan fong og stóra løn fyri at vera Guði lýðin.

Soleiðis fóru ellivu vanligir menn út og kristnaðu fólkasløgini - eftir einum orði av Guði. Soleiðis stóð Luther einsamallur móti øllum heiminum - eftir einum orði av Guði.

Gævi, at vit eiga sama mót, um vit verða sett á hesa roynd. Amen!

BAADER

Vit hava eykalutir á goymslu og útvega teir, vit ikki hava.

Pf. Petur Larsen

Tlf: 44 41 74
Fax: 44 42 85

AGN

sild
saury
kúfiskur
makrelur
høgguslokkur



...dagligt samband um alt landið

P/F KAMBUR

STRENDUR
telefon: 448095 · fax: 448744



# Minningarhaldið fyri teir sjólátnu



*Bjørn Kalsø, virkandi løgmaður, talar*

Aftur í ár var minningarhald um alt landið fyri teir, sum hava látið lív í sínum virki á sjónum í farna ári.

Í Havn var tað sum vanligt hildið á Hotel Tórshavn, fyrrverandi sjómansheiminum. Tað hevur verið ivi um staðið, eftir at sjómansheimið varð selt til Hotel Føroyar. Men tað var eingin trupulleiki at fáa eina avtalu við eigararnar um, at haldið skuldi vera sum vanligt, og tað rokna vit eisini við at tað verður framyvir. Munurin er bert tann, at meðan tað fyrr var sjómansheimið, sum skipaði fyri, er tað nú sjómansmissiónin.

Vanligt er, at løgmaður og ein prestur tala á sjómansheiminum. Tað kemur sjálvsagt fyri, at løgmaður er burturstaddur 1. november, og so var hesa ferð. Tá er tað virkandi løgmaður sum talar, og var tað hesa ferð Bjørn Kalsø, fiskimálaráðharri. Tað kundi ikki passa betur. Presturin í ár var Bjarni Bæk, dómpróstur. Síðan varð farið niðan á minnisvarðan, har Bjørn legði krans.

Um kvøldið var sum vanligt minningargudstænasta í Havnar Kirkju, har Inga Poulsen Dam talaði. Aftaná var sum vanligt boðið til ein drekkamunn á sjómansheiminum. Tað var heilt fitt av fólki, sum luttók í hesum tiltøkum.

Vit hava nakrar myndir frá haldinum.

*Jógvan Højgaard skipaði fyri minningarhaldinum vegna sjómansmissiónina. Jógvan hevur partvíst avloyst Torleif Johannesen, meðan hann er í farloyvi.*





*Bjarni Bæk hevur bøn.*



*Tað var væl av fólki á sjómansheiminum.*



*Aksel Hansen á sjómansheiminum saman við abbasoninum Tórur. Aksel hevði viljað havt minni við slíkt minningarhald at gera, enn hann hevur. Komandi ár eru tað 50 ár síðani, "Stella Argus" gekk burtur við yvir 20 monnum, og tá eru eisini 40 ár síðan "Nólsoyar Páll" vanlukkuna, sum kostaði fýra fiskimonnum lívið. Bæði hesi skip vóru partur av Poul Hansen fyritøkuni.*

*Oda og Jørgen Mørkøre. Millum tey er Jan Kjell Jacobsen.*



Samrøða við Andreas í Tarti – 4. partur:

**At taka úr blaðnum**

**Síðurnar 9, 10, 15 og 16 eru samanhangandi og kunnu takast úr blaðnum**

# Tríatíárini vóru vanlukkulig, og so kemur kríggið

Í áhugaverdu frásøgnini hjá Andreas í Tarti koma vit nú til tríatárini, tá nógvar sluppir gingu burtur við fleiri hundrað monnum, sum fingu váta grøv. Umframt hetta var eisini heimskreppa, og inntøkan var litil. Men so koma vit til annan heimsbardaga...



### 1931

Í 1931 fari eg annars við "Tvey Systkin", og var tað aftur við Jóan Magnus har Niðri sum skipara. Vit fóru á Suðurlandið og vóru 26 mans at byrja við. Har vóru ov fáar koyggjur, og tær vóru tríggjar á hædd eisini. Tá vit eru reiðiliga yvirkomnir, verður Tummas, beiggi skiparan, sjúkur. Hann skuldi trekkja út tenn, men tonnin brotnaði. Tað kom bruni í, og hann mátti heim, so vit blivu bara 25 mans. Men tað var sera gott fólk.

Tvær ferðir fingu vit skaða. Eina ferð var tað róðurskaði, og eina ferð var tað skrúvan, og har mistu vit 14 dagar í fínasta veðri, men vit fingu 96.000 fiskar. Vit høvdi helst verið besta skipið, vóru vit ikki tarnaðir. Eg minnist, at tann besti var Petur Hans (Hansen) í Skálabotni, hann stóð fremstur, og hann var ungur. Eg meini vist, at hann hevði 4.900 á snøri. Tann næsti hevði 4.500, og so lógu teir javnt um 4.000 fiskar hvør. Men inntøkan var sera litil, vit fingu 10 oyr fyri stykkið, fyri tað vit landaðu í Føroyum, men vit fingu 18 oy pr. stk. fyri tað, vit landaðu í Íslandi.

Men nú skulu vit fara til Grønland, og maskinan gekk fyri. Maskinan varð afturgjørd, men hetta gjørdi so tað, at vit fóru til Íslands. Men tað var so púra mislukkað. Vit fingu 400 skippund, og teir fóru niður við tí. Tá var tað, at skyldmaðurin Dánjal á Viðareiði slerdi út. Teir skuldi repa seglini, og hann átti frívakt. Tað gekk so illa at fáa hann upp úr koyggjuni, so hann hevur følt sær okkurt. Onkur segði, at hann setti seg á kappan, og eitt brot kom og tók hann yvirborð.

Vit fingu einki burtur úr. Vit fingu kr. 150 fyri túrin. So lítil var prísurin, um teir fóru niður við lastini.

### Til Havnar at loysa kekk út

Nú fái eg ein kekk um heystið. Tað var soleiðis, at man hevði illa ráð til at fara til Havnar. Man fór ikki meira til Havnar enn onkuntíð. Men so fari eg ein túr til Havnar og skal fara at loysa hendan vælsignaða kekk út. Tað bar soleiðis á, at eg kom at møta Absalon, reiðaranum. Hann var á veg oman eftir Áarvegnum, og eg var á veg niðaneftir. Tað fyrsta hann spyr er, um eg havi verið í bankanum. Eg sigi nei. Hann roknaði ikki við, at tað var dekningur fyri kekkin, segði hann. Men um tað ikki var dekningur, skuldi eg koma oman til Karl á Lag, so skuldi hann orðna tað við hann. Eg fari í bankan, nei har var eingin dekningur. So fari eg oman til Karl á Lag, nei hann kundi ikki hjálpa mær, men bað meg steðga.

Hann skuldi orðna tað við Christensen, sum var sakførari hjá Føroya Fiskimannafelag, ið átti "Coraliu". Hon skuldi á beding á Skála, sum Absalon átti. Teir pengarnir, ið eg átti, skuldu ganga av rokningini, sum "Coralia" skuldi betala til bedingina.

Soleiðis fekk eg tær 150 kr. Hvør reiðari hevði gjørt tað? Eg skal rósa honum. Tað bar ikki til at keypa varu á Skála, tí tað var so ringt at fáa tað til hús, tá man búði so avsíðis. At fáa varu var jú vanligi mátin at fáa slætt borð við reiðaríið.



*Andreas fór við "Tvey Systkin".*



*"Silver Lining", sum Justines í Oyndarfirði átti.*

Hetta árið mistu vit nógv av okkara skipum, og vóru tey "Queen Victoria","Queen","Ondine" og "Gefion".

Sama heystið hendi tað syrgiliga, at vestmannasluppin "Dora" gongur burtur, og allir 17 umborð sjólátast. Hon var seinast sædd av "Fram" tann 18. september á Rødhukgrunninum. Tá kom eitt so knappligt illveður, tað kom sum úr byrsuni, og hetta er eisini eitt illveður, sum eg minnist væl. Her var grunt og ójavnur botnur, og tí var farvatnið ringt og aldan var so tung, tá soleiðis var. Tá tað leið út á dagin, minkaði vindurin, men einki sást aftur til skipið. Hetta var ein sokallaður javndøgursstormur, sum vanliga var hesa tíðina. Vanliga fóru sluppirnar heim um hálvan september, meðan tey størru skipini, skonnartirnar, støðgaðu nakað longur. Heima varð bíðað eftir "Doru", men tá vónirnar minkaðu, fór "Seagull" av Vestmanna til Íslands at leita, men einki funnu teir.

### 1932. Nú fáa vit flekiborð!

Nú fari eg við Hans Jacob Abrahamsen, hiðani úr Oyndarfirði, sum skuldi føra "Sæborg", og tað gekk gott. Tað var Dorius Hvidbro í Klaksvík, sum átti "Sæborg", og Klaksvíkshandilin reiddi hana út.

Hetta ár hendi ein rættilig kollvelting. Hetta árið var fyrstu ferð, vit fingu flekiborð. Tað var av tí, at bestimaðurin, Andreas á Fløtti, hevði verið við íslendskum trolara, har teir høvdu flekiborð. Áðrenn tað stóðu menn mestsum á høvdinum og flaktu niðri á dekkinum. Ein slík arbeiðsstøða var jú sera ting fyri ryggin. Hetta gav teimum eisini ein so ræðuligan bróstsviða. Fyrst, tað varð roynt at fáa flekiborð umborð á skipini, var stór mótstøða, hóast tann upplagdi fyrimunur tað var at kunna standa upprættur og flekja. Tað eru enntá søgur um, at flekiborðini vórðu blakað fyri borð, tí menn vildu ikki vita av teimum. Men soleiðis var ikki hjá okkum. Við onkrum skipi var skipað fyri kapping, um tað var skjótari at flekja á dekkinum ella á borði. Hetta avgjørdi sakina við tí skipinum.

### "Laura" og "Immanuel" ganga burtur

Hetta var sama túr, sum "Laura" og "Immanuel" forlistu. Vit høvdu fiskað 22.000 fiskar og skuldu heim. Vit vóru væl mannaðir, yvir 22 mans. So nógvar koyggjur hevði hon ikki, so her vóru eisini tvímanskoyggjur. Nú er tað so, at vit praja "Lauru" av tí, at maskinmeistarin á "Lauru", Niclas Lassen, hevði verið árið frammanundan við einum motorbáti, sum bleiv leigaður til Oyndarfjarðar, og sum kallaðist "Føroyingurin", og tí kendu oyndfirðingar hann so væl. Eg meini, at Hans Jacob, skiparin sjálvur, tosaði við hann. Tá hevði "Laura" 18.000 fiskar inni, og hon var ein lítil slupp. "Sæborg" hevði 22.000 fiskar. Vit koma heim eitt fríggjakvøld. Leygarmorgunin fara vit at landa í allarfínasta veðri í Oyndarfirði, og vit tøma skipið, 400 skippund, eftir einum leygardegi. Skipið varð so fortoyað fyri báðum ankarum. Eg tørni inn. Harra Jesus, eg verði vaktur tíð-

*Framhald á næstu síðu*

liga sunnumorgun at koma umborð. Tá er stormur og kavarok, og “Sæborg” var farin í drift. Bjargingarbáturin er í landi. Tað var ikki øll manningin, sum var úr Oyndarfirði. Eg minnist ein mann, Sofus Rinkustein, sum skiparin mátti biðja afturat at hjálpa til. Báturin varð vendur í støðni, og 6 mans sótu til árar. Tað var akkurát so, vit kláraðu at koma út frá. Vit passaðu okkum løgi millum glaðurnar, so tað lukkaðist okkum at koma umborð og at fáa motorin í gongd. Tað sum var leyst á dekkinum, tað feyk alt. Kokkurin hevði sett bakkar og tílíkt upp, tað var alt farið til sjós. Tað eydnaðist so at fáa skipið fortoyað aftur, sum tað skuldi.

“Silver Lining” var komin á Mýling, tá hann bresti á. Reiðarin og skiparin Justines Eidesgaard var ein maður, sum legði nógv fyri. Men ikki hættaði hann sær at fara í Djúpini. Hann fór vestur í Vágahavið. So ringt var hetta veðrið, tá “Laura” og “Immanuel” eru farnar. Eg eri klárur yvir, at vit eru seinasta skip, sum hevur tosað við “Lauru”. Vit hava annars havt fleiri aðrar frásagnir her í blaðnum frá øðrum um hetta sama veðrið. Erling Poulsen hevur eisini skrivað eina bók um hendan sorgarleikin.

So fara vit til Ísland um heystið. Tá kom eisini eitt slíkt ódnarveður. Vit royndu norðanfyri nesið, Langanes. Hetta hevur verið í javndøgurstíðini, um 20.september, og har blívur ein sovorðin alda. Trykkið hevur verið líka har til, tá var tað at takið fór av húsinum hjá pápa. Andreas Petersen, bestimaðurin, hann hevði átt og ført “Esther”, hann mundi kenna til ta leiðina. Vit fingu væl av fiski har, og tá vit koma heim, eru vit av teimum bestu skipunum í Klaksvík tann túrin, so tað bleiv eitt gott ár.

## Vaktir andaliga

Her skal eg skoyta uppí, at fleiri av manningini við “Sæborg” vóru umvendir innan heimamissiónina. Umborð varð sungið nógv, og tað vóru ofta møtir umborð. Hesum varð eg eisini ávirkaður av og varð vaktur andaliga. Hetta hevur givið mær eina góða barlast seinni í lívinum. Ein annar oyndfirðingur varð eisini vaktur henda túrin, og var tað Poul Martin í Ansastovu, seinni kendur sum bátasmiðjur og eisini sum prædikumaður. Vit báðir gróvu saman við Jákupi í Skúlanum fyrstu bøkkirnar fyri missiónshúsinum í bygdini.

Her kann eg skoyta uppí eina frásøgn frá 1936. Nú kemur ein stór grind í Gøtu. Eg var í teirri grindini, eg fór við “Guide Me”, sum eg átti tá. Tá drápið er liðugt á kvøldi, er dansistovan opin til grindadansin. Men í Gøtu var eitt nýtt missiónshús, og tað var eisini opið, og her var møti. Talarin var Johan Hofgaard, ein veldigur predikantur. Eg minnist, at hann talaði út frá, at “Gud man ráða hvar vit drekka onnur jól”. Íblásturin til hendan tekstin kann saktans hava verið tann sokallaða meslingagrindin í Gøtu í desember 1935, tá nokkso nógv fólk vórðu smittað av meslingum, og fleiri doyðu bæði í Gøtu og aðrastaðni í landinum. Meslingagrindin er fyrr umtalað her í blaðnum og hóskaði væl til umrødda tekstin.

Sigast kann um Johann Hofgaard, at hann var føddur við Garð í Hovi í 1883. Hann gjørdist arkitektur, og tað standa nógv minni um hann kring landið, sum t.d. kirkjan í Vági. Hann teknaði eisini skúlan í Fuglafirði og tann við Gøtugjógv.

Sum sagt var Hofgaard, sum hann vanliga varð nevndur, av bestu prædikantum. Í sínum starvi ferðaðist hann nógv, hann plagdi um vetrarnar at vera norðanfjørðs, og hann nýtti altíð høvið til at taka orðið á missiónsmøtum.

Hofgaard var ofta í Oyndarfirði til missiónsviku, og síðstu ferð, hann kom higar, var áðrenn vegurin kom saman. Hann var eina heila viku og gisti hjá Jónu og Edvard í Kinn. Hann hevði bíbliutíma hvønn dag, og eg vildi ikki forsøma ein tíma. Eg kann minnast, at hann tosaði út frá Hebrearabrævinum. Honum kundi eg lurta eftir, um tað var alla náttina. Tað kundu fleiri siga.

Johan Hofgaard doyði í 1966.

## Í 1933. Aftur við “Sæborg”

Í 1933 fóru vit avstað aftur við “Sæborg”. Vit vóru 23 mans. Hetta er einastu ferð, eg veit um, at maður hevur staðið út millum stórvantið og fiskað, av tí at tað var ikki annað pláss, og var hetta beiggi skiparan, Edmund. Hann gekk í skúla og lærdi. Hann fór so niður áðrenn kríggið, men doyði stutt eftir. Tað gekk hampiliga gott henda túrin.



Justines saman við konuni Magninu.



Poul Martin Anthoniussen, sum eisini var við til at grava fyri missiónshúsinum.



Missiónshúsið, sum Andreas var við til at byggja.



Grindin í Gøtu í 1936, har Andreas var við og fór á møti í Missiónshúsinum.

Nú verður “Sæborg” seld til Leirvíkar til Hjalmar Joensen og aðrar. Eg kom so at fylgja við har sum annar bestimaður. Nú kendi eg tann skiparan, sum eg hevði verið fleiri ár saman við, nevniliga Napoleon Christiansen úr Lorvik. Her gekk eisini væl. Meginparturin av manningini vóru leirvíkingar. Eg minnist, at vit vóru 18 leirvíkingar við og 3 oyndfirðingar.

## 1934. Vanlukkuárið hjá “Neptun” og “Nólsoynna”

1934 kom at gerast eitt lagnuár fyri fiskimannafelagið. Hetta var jú krepputíð, og truplar samráðingar vóru millum fiskimannafelagið og reiðarafelagið, har verkfall gjørdist úrslitið. Hetta endaði við, at fiskimenn norðanfjørðs tóku við einum semingsuppskoti, sum fiskimenn sunnanfjørðs vrakaðu. Tað førdi aftur til, at felagið fór sundir, og úrslitið gjørdist eitt Suðuroya Fiskimannafelag. Feløgini komu tó saman aftur í 1957.

Hetta er árið, tá “Nólsoyggin” og “Neptun” ganga burtur, sum eisini er greitt frá her í blaðnum. Vit vóru helst teir síðstu sum sóu “Nólsoynna”. Ein stormur var á Suðurlandinum 27. apríl, hetta var ein rokstormur. So blíva nakrir dagar, har tað er gott veður, og nú fara skipini vesturum. Vit sigla í fínasta veðri vestureftir og brúktu bara motorin. Eg átti frívakt, tá vit komu um Reykjanes.

Tá vit eru komin nakað forbí, fortaldu teir fyri mær, at vit høvdu passerað “Nólsoynna,” og hon fór eysturyvir við størstu seglum við toppsegli, og eg hugsi, at hon hevði breiðfokkuna eisini.

Vit kláraðu tað ikki longur enn á Skagen, tá brendi hann á. At koma undir tað veðrið við størstu seglum hevur ikki verið lukkuligt. Hon eigur ikki at vera komin longur enn eystur um Grindavíkina. Eg kann ikki siga tað sikkurt, at eg sá hana, tá eg kom upp og fór á vakt, men hetta fortaldu teir so. Tað var so ringt veður, at vit lógu inn móti rivunum á Skagen og tordu ikki at venda. Men tíbetur tað linkaði so mikið, og tá veðrið blíðkaði, tá slitnaði stagið hjá okkum.

Eg vil fortelja, hvat ein hósvíkingur fortaldi, hann er deyður nú. Vit vóru saman við “Nólsoyar Páll”. Hann fortaldi fyri mær, at eitt konufólk hevði droymt skiparan á “Nólsoynni” tríggjar nætur uppí slag. Hann stóð so syrgin í kappanum og fortaldi fyri henni, hvar teir vóru. Tað

Framhald á síðu 15

FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA





Betlehem í dag

## House of Hope:

# Blindaheimið í Betlehem

Á eini Ísraelsferð er ein vitjan í Betlehem ein sjálvfylgja. Har búgva í dag 35.000 fólk

Tað er bert ein løta at koyra frá Jerusalem, men kortini er hetta sum at koma til eitt heilt fremmant land. Betlehem liggur á palestinskum sjálvstýrisøki, og millum hesi og Ísrael er bygdur ein umstríddur múrur, sum skal forða yvirgangsmonnum at koma inn í Ísrael. Hetta er kanska skiljandi, men lýsir hesin múrur einsamallur støðuna í økinum.

Aftrat hesum kemur, at bussar frá Ísrael kunnu bert koyra til múrin. Tá mátti skiftast til buss úr Betlehem at koyra restina av teininum.

Betlehem er sjálvsagt nógv merktur av, at Jesus varð føddur har. Umframt eru nógvar aðrar bíbilskar hendingar knýttar at Betlehem. Hetta merkist ikki minst á kirkjunum í býnum. Tveir triðingar av fólkatalinum eru muslimar. Hesin partur økist í hvørjum. Ein orsøk er, at muslimar fáa fleiri børn enn kristin, og ein onnur er, at nógv kristin flyta av landinum, serstakliga til USA og Suðuramerika.

### Blindheimið

Okkara fremsta mál var tó at vitja "House of Hope", vanliga kallað blindaheimið. Hetta er eitt heim, sum Svenning av Lofti hevur eitt serligt samband við, og sum hann vitjar á øllum sínum ferðum í Ísrael.

Hetta er eitt heim og skúli, sum verður rikið av arabarum á einum kristiligum grundarlagi, og sum fremur eitt gott arbeiði fyri ung og eldri blind, kropsliga brekaðar ungar menn og fyri børn, sum eru menningartarnað, sum ofta eru fyri vanbýti á leiðum sum hesum.



Ein av menningartarnaðu næmingunum.



Tað var May Ladah, sum stovnaði House of Hope.

Hetta arbeiðið byrjaði í 1963 av eini blindari kvinnu, May Ladah, nevnd "Aunty May", sum doyði í 1993, 89 ára gomul, og eini síggjandi hjálparkvinnu, Christine David. Byrjað varð í smáum, men sum frá er liðið, er virkið eins og umstøðurnar nógv bøttar. Nú eru umstøðurnar góðar við tveimum uppá seg stórum bygningum.

Einir 40 næmingar eru á skúlanum. Summir búgva har, og aðrir koma frá økinum í og kring Betlehem. Næmingarnir verða koyrdur í og úr skúla, og teir fáa eisini eina heita máltíð í skúlanum. Hjá fleiri er hetta einasti biti, tey fáa á degnum.

Virksemið hjá House og Hope verður fíggjað av vinum, kirkjum, samkomum og felagsskapum. Uttan slíkan stuðul, hevði arbeiðið verið ómøguligt. Føroyingar hava eisini havt sín leiklut her. Júst nú tørvar fígging til ein nýggjan buss fyri tann gamla og slitna.

Navn og konto hjá Blindaheiminum "House of Hope" í Føroyum er:

Blindaheimið í Betlehem, konto 9181 185.119-7 í Føroya Sparikassa.

Tað eru 15-20 lønt starvsfólk á heiminum. Aftrat tí eru og hava verið sjálvbodnir útlendingar, eisini føroyingar.

Tað eru umleið 50 fólk, sum búgva á heiminum, og eru tey frá 7 til 90 ára gomul. Roynt verður at útvega teimum blindu okkurt at gera. Í kjallaranum er vardur verkstaður fyri tilkomnar og eldri blindar menn. Har gjørdu teir m.a. bustir og kustar. Heimið hjálpir 75 persón-



Blindaheimið, sum tað sær út í dag.




Hetta er múrurin, millum Ísrael og Vestara Áarbakkan.



Óli Jákup og Elma saman við næmingum á skúlanum.

um við breki, men tey hava ein bíðilista við 350 nøvnum, so tørvurin er stórur.

### Eingin munur millum kristin og muslimar

Sigast kann, at hetta var ein hugtakandi vitjan. Eftir at hava hoyrt so nógv líkt og ólíkt um arabarar og muslimar var tað vælgerandi at síggja, hvat ið kundi gerast í einum kristnum anda í hesum øki, har vit hava hoyrt so nógv minni gott.

Tað verður ikki munur gjørdur á muslimum og kristnum, og øll eru vælkomin og kenna seg eisini vælkomnan. Júst hendan dagin hittu vit eina muslimska mammu sum fyrstu ferð kom við sínum menningartarnaða soni. Takkað verið House of Hope kann hann fáa eitt rímiligt lív. Alternativið vildi verið ein vanvirðislig tilvera. Børnini vóru annars sera fitt og blíð, og tey vóru ógvuliga glað fyri at fáa vitjan.

Tað verður gjørt tað, sum kann gerast, fyri at samansjóða tey, sum varða av heiminum. Í mai var ein samkoma, har foreldur vóru boðin við, og tey hugnaðu sær ófórt. Skipað verður eisini fyri útferðum fyri búfólkið, og í summar hava tey verið í Jeriko.

### Truplar umstøður

Men tað er ikki lætt at liva her, serliga eftir at Hamas hevur fingið stjórnarvaldið við øllum tí ruðuleika, sum hetta hevur ført við sær. Eitt dømi um hetta er, at almenn starvsfólk høvdu ikki fingið løn í fleiri mánaðir. Ófriðurin í økinum hevur eisini ført til minking í ferðafólkatalinum, og hetta merkir eisini meira arbeiðsloysi í einum býi, sum er heftur av ferðavinnuni. Frammanundan var arbeiðsloysið stórt á Vestara Áarbakka, eini 18%, og nú er tað uttan iva enn hægri. Annars er tað ikki her, at tað er tann ófriður, sum vit javnan frætta um. Tað er mest í Gaza, har stjórnin situr. Vit spurdi onkran, hvat hann hevði valt til palestinska tjóðartingið. Tað er nú ikki so nógv at velja ímillum, men hesin hevði so valt Fatahflokkin, sum misti valdið, og sum er tann uppá seg hóligi parturin í hesum økinum.

Fyrr hava arbeiðarar í palestinskum økjum frítt kunnað arbeitt í Ísrael og hava kunna forvunnið til sítt uppihald. Hetta er nógv broytt orsakað av ísraelskum tiltøkunum móti yvirgangi. Hesi ganga fyri ein stóran part útyvir vanliga fólkið. Okkara bussførari í Betlehem greiddi frá, at skuldi hann til Ísrael at koyra við sínum bussi, so kundi hann bert fáa eitt loyvi, sum galt ein dag, og tað tarnaði honum nógv í arbeiðsmøguleikunum.

Tey eru nógv, sum finnast at Ísrael fyri at vera ov harðrent. Hesar atfinningar koma eisini frá teirra egnu kristnu vinum og stuðlum á okkara leiðum.

Kristna blaðið "Udfordringen" hevði um dagarnar eina ferðafrásøgn úr Ísrael, skrivað av einum fyrrverandi donskum trúboðara í Grønlandi. Hann stuðlar avgjørt Ísrael, og hann skilir væl, at landið má verja seg ímóti yvirgangi. Men hann heldur, at teir kundu verið meira menniskjansligir. Hann heldur m.a., at tað verður gingið ov vítt at tarna arabarum í teirra arbeiði, eisini í samband við dyrking av teirra jørð. Millum annað verða lagdir meinbogar í vegin fyri sjúk fólk, sum tríggjar ferðir um vikuna skulu í dialysu á sjúkrahúsi í Jerusalem. Hetta er ein viðgerð, sum er lívsneyðug, og har tað ikki kann vera rímiligt at leggja meinbogar í vegin. Eisini sæst, at í teirra krígsførslu fyri tilverurætti sínum ger Ísrael mistøk eins og onnur, og hetta skapar trupulleikar hjá teimum, sum annars stuðla Ísrael.

### Kundu verið nakað at stuðla hjá tí almenna í Føroyum

Vitjanin í Betlehem var minnilig, og ikki minst vitjanin á "House of Hope", har tað veruliga verður roynt at bøta um tær vánaligu umstøðurnar í hesum øki. Tess betri hetta eydnast, tess størri møguleiki er fyri, at fólkið í økinum vil og kann liva saman í sátt og semju.

Hetta skuldi kanska verið eitt øki, har vit kundu latið ein part av játtanini hjá landskassanum til menningarhjálp.

Í komandi blaði vitja vit í Nazaret.

Svenning ber heilsu fram. Her sæst hann saman við leiðaranum á blindaheiminum Rhoda David.





Hesi bæði blindu sungu fyri føroysku gestunum, og var tað hugtakandi at hoyra.





Her er ein muslimsk mamma komin fyrstu ferð á skúlan við sínum menningartarnaða soni. Hann sær eitt sindur kroystur út av tí roki, sum er av føroysku vitjanini, men tað man fara at javna seg.



# Prentmiðstøðin

Prentmiðstøðin átekur sær nú eisini at bera onnur bløð út, til øll húsarhald. Tað verið seg tilskriftarleys lýsingar- og onnur bløð. Útberingin kann fara fram í øllum landinum ella í teimum pørtum, sum ynskist. Tilskriftarleysar sendingar, sum eru Prentmiðstøðini í hendi í seinasta lagi mánadag kl. 17, verða útbornar týskvøldið.



Prentmiðstøðin- tel. +298 35 14 00 - Faks.+298 35 14 01 - e-mail: prent@prent.fo
Útberingin - tel. 35 14 05 - e-mail: utbering@prent.fo




Neyðstøður á sjónum krevja ein bjargingarbát, sum er álítandi og skjótur at sleppa í. Tíðin er avgerandi, og fullkomilig vissa má vera fyri, at báturin virkar. Fyrstu ferð.

Set títt álit á eitt gott merki og eina ábyrgdarfulla tænastu. Fønix umboðar viðurkendu bjargingarbátarnar RFD og DSB, ið fáast til bátar og størri skip. Og Fønix er góðkent at veita tænastu og eftirlit, ið livir upp til øll krøv.

Fønix - á Hjalla, Hoyvík - Tel. 31 16 31 - www.fonix.fo

Fønix
Tryggleiki til heimið, virkið og skipið




Reykjavík
og aftur fyri
1814,-

Keypmannahavn
og aftur fyri
2020,-

Billund
og aftur fyri
2046,-

... og tá eru skatturin og onnur avgjøld íroknað.

Tilboðið er galdandi fyri ferðir millum 10. november og 13. desember á úrvaldum fráferðum. Prísdømini omanfyri eru við keypi á heimasíðuni atlantic.fo. Ferðaseðilin skal keypast 7 dagar undan fráferð, og tú skalt verða burtur náttina millum leygardag og sunnudag. Les meira á heimasíðuni.

Prísdømi: Vágar - Keypmannahavn fram og aftur 695,- + 695,- Ferðaavgjøld 580,- Avgreiðslugjald (internet) 50,-

www.sansir.fo

Tel 352 900 · Faroe Travel Tel 312 600 · FLOGFELAG FØROYA Tel 340 000 · FONN FLOG Tel 456 363

Bílegg feðaseðilin á tíni ferðaskrivstovu ella á www.atlantic.fo

ATLANTIC AIRWAYS
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01
www.atlantic.fo


# Uppskot um minstaforvinning til útróðrarmenn

**Ár 2006, 3. november, legði Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi Uppskot til løgtingslóg um mánaðarligan minstaforvinning til útróðrarmenn**

Útróðrarmenn hava, eins og fiskimenn, í mong ár havt eina skipan við inntøkutrygd. Hjá útróðrarmonnum hevur tó verið truplari at fáa eina fasta skipan, tí útróður er so nógv øðrvísi enn fiskiskapur. Tað var seinast í 90-unum, at útróðrarmenn fingu sína verandi skipan á økinum. Hon hevði tað brek, at upphæddirnar vóru lastar fastar, og tí ikki fylgdu lønargongdini í samfelagnum. Meginfelag Útróðrarmanna hevur tí stríðst við at fáa lógina dagførda, og tað er eydnast við hesum lógaruppskotinum. Vit endurgeva viðmerkingarnar til uppskotið, sum vísa tær avgerandi broytingarnar í mun til verandi skipan.

## Avleiðingar av uppskotinum

Í lógaruppskotinum er upphæddin sett til 100 vanligar tímalønir, sum við galdandi tímaløn gevur kr. 10.080 um mánaðin. Vanliga tímalønin á landi var í 1997 kr. 75,86 og er síðani hækkað til kr. 100,80, ella ein hækking uppá góð 32%. Tí verður mett, at tíðin er komin at dagføra upphæddina til minstaforvining til útróðrarmenn.

Minkingin av minstaforvinninginum er sambært uppskotinum sett til 50% eins og í gomlu lógini, soleiðis at stuðulin fellur burtur, tá samlaða inntøkan er komin upp á kr. 20.160 í mun til áður kr. 16.400.

Samstundis sum kravda avreiðingarvirðið seinasta 6 mánaðaskeiðið er økt frá kr. 54.000 til kr. 70.000, er áseting gjørd um, at ávíst avreiðingarvirði eisini skal vera fyri tríggjar teir seinastu mánaðirnar.

Mett verður, at hækkingin í avreiðingarvirðinum seinasta hálva árið upp á kr. 16.000 fer at hava við sær eina árliga minking í útreiðslunum. Nakrir útróðrarmenn, sum ikki dríva útróður burturav, fara kanska ikki at fáa nakað útgjald úr skipanini. Hinvegin kann hugsast, at við tað, at kravda avreiðingarvirðið verður hækkað, tess størri verður hýran og tí minni minstiforvinningur.

Tað er torført at meta um meirútreiðslurnar av uppskotinum, men útrokningar hjá fíggjardeildini vísa, at verða hesar broytingar samtyktar, fer tað at hava við sær eina árliga meirútreiðslu upp á 24% ella umleið 1.900.000 kr.

Lógaruppskotið verður mett at hava tær fíggjarligu avleiðingar við sær, at útreiðslurnar hjá landskassanum hækka samsvarandi hækkanini í útgjaldinum av minstaforvinningi til útróðrarmenn.

## Fíggjarligar avleiðingar

Útreiðslurnar til minstaforvinning hava síðani seinastu lógarbroyting í 1997 verið hesar:

| | | |
|---|---|---|
| - 1997 | 29,5 | mió. |
| - 1998 | 18,3 | mió. |
| - 1999 | 18,6 | mió. |
| - 2000 | 11,2 | mió. |
| - 2001 | 10,3 | mió. |
| - 2002 | 8,2 | mió. |
| - 2003 | 11,0 | mió. |
| - 2004 | 11,3 | mió. og |
| - 2005 | 8,8 | mió. kr. |

Eftir at galdandi lóg kom í gildi við ársbyrjan 1998, hevur lækkingin verið munandi.

Undir skipanini við minstaforvinningi vóru í 2005 út við 300 útróðrarmenn tilmeldaðir.


SELUR TÚ

skipa- ella bátaútgerð?

So er FF-blaðið ein hollur boðberi, sum fer umborð á skipini – umvegis reiðaríini – hvønn útgávudag.



Gerið tí eina skilagóða lýsingaravtalu við okkum

FFblaðið BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA

Telefon 31 15 69
ff-blad@post.olivant.fo



HYGGIÐ HER!

Nú er møguleiki at ogna sær ein føroyskt bygdan hjall.

Tygum kunnu fara inn á heimasídu mína
www.123hjemmeside.dk/sofus-hansen_tysone
og har bíleggja/sóknast eftir tilboði
við at senda ein teldupost.

Vinarliga Sofus Hansen

T-postur: sofushansen@mail.dk





Línubustir og goggar

Hondbundin føroysk línubust
og hondgjørdir goggarar

Verða sendar um alt landið

**Bílegging:**
tlf: 42 40 34 / 42 30 01
fartlf: 21 33 17
fax: 42 47 97

Fløttislið (limur í Føroya blindafelag)

## Værdiudbytte af Fiskeri fra Færøerne.

| | 1926 | 1927 | 1928 | 1929 | 1930 | 1931 | 1932 | 1933 | 1934 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Kuttere ved Island ...... | 4984995 | 4309862 | 6839305 | 6576048 | 5570858 | 4460681 | 3415157 | 4287130 | 3127858 |
| — - Grønland.... | 291000 | 353512 | 197200 | 1431650 | 1962025 | 1187261 | 1300540 | 1814892 | 2834657 |
| — - Bjørneøen ... | | | | | | | | | 80437 |
| — - Færøerne ... | 77254 | 90065 | 34232 | 524 | 14686 | 9922 | 7590 | 13830 | 14000 |
| Baade - — ... | 507004 | 614736 | 491737 | 255815 | 286223 | 140278 | 410735 | 244323 | 257907 |
| Tilsammen... | 5860253 | 5278175 | 7562474 | 8264037 | 7833792 | 5798142 | 5134022 | 6360175 | 6314854 |

| | 1935 | 1936 | 1937 |
|---|---|---|---|
| Kuttere ved Island ...... | 3657815 | 1691316 | 2719951 |
| — - Grønland.... | 2130040 | 1081085 | 2803193 |
| — - Bjørneøen ... | 92000 | 1299365 | 449562 |
| — - Færøerne ... | 7077 | 11527 | 47056 |
| Baade - — ... | 351772 | 161059 | 263316 |
| Tilsammen... | 6238704 | 4964351 | 6283078 |

## Saltfiskepriser i Kr. 1912—1938.

| | 1912 | 1913 | 1914 | 1915 | 1916 | 1917 | 1918 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Islandsfisk.. | 0.25 | 0.32 | 0.33 | 0.46 | 0.48 | 0.53 | 0.74 |
| Færøfisk ... | 0.22 | 0.27 | 0.32 | 0.42 | 0.47 | 0.52 | 0.74 |

| | 1919 | 1920 | 1921 | 1922 | 1923 | 1924 | 1925 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Islandsfisk.. | 0.82 | 0.82 | 0.63 | 0.44 | 0.38 | 0.54 | 0.56 |
| Færøfisk ... | 0.78 | 0.80 | 0.54 | 0.54 | | | |

| | 1926 | 1927 | 1928 | 1929 | 1930 | 1931 | 1932 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Islandsfisk.. Færøfisk ... | 0.30 | 0.28 | 0.37 | 0.36 | 0.27 | 0.19 | 0.21 |

| | 1933 | 1934 | 1935 | 1936 | 1937 | 1938 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Islandsfisk.. Færøfisk ... | 0.27 | 0.30 | 0.33 | 0.32 | 0.32 | 0.34 |

## Antal færøske Fiskere, der har deltaget i Skibsfiskeri ved

| | Færøerne | Island | Grønland | Svalbard og Bjørneøen |
|---|---|---|---|---|
| 1928 | 165 | 2874 | 106 | |
| 1929 | 13 | 3145 | 781 | |
| 1930 | 104 | 3236 | 1513 | |
| 1931 | 28 | 3045 | 1190 | |
| 1932 | 49 | 3040 | 1411 | |
| 1933 | 17 | 3195 | 1628 | |
| 1934 | 31 | 3528 | 2505 | |
| 1935 | 23 | 3470 | 2366 | |
| 1936 | 18 | 3406 | 1500 | 1491 |
| 1937 | 180 | 3217 | 2019 | 402 |

Framhald av síðu 10

eru fleiri slíkar frásagnir um "Nólsoynna", og vit høvdu í fjør eina frásøgn hjá Petreu Olsen, sum hevði fleiri avvarðandi við "Nólsoynna", um sama evni.

Eg rokni við, at "Nólsoyggin" hevur verið flótandi tá, og skiparin segði bæði frá breidd og longd, hvar teir vóru staddir. Henda konan spurdi í dreyminum eftir "Neptun", men hann svaraði ikki uppá tað. Eg trúgvi ikki, at skipini hava stoytt saman, sum summi hava hildið. Eg havi verið saman við manninum á Eyrabakka í Íslandi, sum fann líkið á kokkinum á "Nólsoynni".

Annars var 1934 eitt vanligt og hampiligt ár. Vit førdu bátar inn á Vattarnes tey árini. Hesir fóru til lands, sum annars nógvir leirvíkingar hava verið í nógv ár. Bátarnir vórðu tískil settir av her, tá túrurin byrjaði, og tiknir heim aftur á heysti.

Í 1935 var eg eisini við "Sæborg". Hetta var eitt sjáldsamt ár, tí her er ikki so nógv at siga frá vanlukkum hjá skipunum, sum veiddu undir Íslandi. Men í Grønlandi høvdu vit hendingarnar við "Coronet" og við "Blithsome" og "Coralia". Men tað veður, sum hesi skip høvdu, minnist eg einki til, at vit høvdu undir Íslandi.




*Andreas keypti og átti "Guide Me" í 1936 og 1937*




*Andreas varð andaliga vaktur umborð á "Sæborg". Hetta er einasta mynd vit hava funnið av gomlu "Sæborg". Hon er teknað í 1958 av einum drongi á Seyðisfjørðinum, sum plagdi at tekna sluppirnar, sum komu inn higar, og so seldi hann tekningina til manningina.*

### 1936. Keypti skip sjálvur

Í 1936 keypti eg sjálvur skip "Guide Me". Eg var jú ungur og hevði lært, so eg vildi royna nakað nýtt. Eg keypti hann úr Fuglafirði frá Jóan Jakku hjá Mikkjali og Johan Poulsen. Hann var ein deiligur bátur. Hann tók 250 skippund, sama stødd sum "Coralia", men tað var mislukkað fiskarí.

Tann 16. september 1936 hendi ein ræðulig sjóvanlukka undir Íslandi. Tá gekk franska kanningarskipið "Pourquoi Pas?" burtur í Faksaflóðanum, og 39 av teimum 40 monnum umborð druknaðu, sum greitt frá í heyst í FF-blaðnum.

Hetta minnist eg eisini sera væl. Men eg minnist eisini, tá skipið kom á Fuglafjørð á síni seinastu ferð norð eftir í juli mánaða. Eg minnist, tá bátur kom í land við skiparanum. Hann legði at við endan á Piddabrúgv, teir kallaðu, og Gamli Sámal Petur fór oman ímóti honum. Skiparin var ein framúr vakur maður.

Kanningarskipið gekk burtur um miðjan september í einum ódnarveðri, og tá var eg við "Guide Me" á Eysturlandinum. Her var veðrið eins ringt. Vit lógu ankraðir við Bakkafjørðin, og veðrið var so ringt, at vit máttu hava fulla ferð á motorinum fyri ikki at slíka ankarketuna. Hetta er einasta ferð, eg minnist, at vísarin á barometrinum hevur sveiggjað upp og niður, sum hann gjørdi her. Vanliga fer vísarin spakuliga hvønn vegin.

1936 var eitt sera vánaligt ár hjá skipum yvirhøvur. Várfiskaríið var miseydnað, og nógvir reiðarar fóru av knóranum. Afturat hesum var borgarakríggj í Spania, sum var ein av okkara høvuðsmarknaðum, og teir kundu ella vildu ikki gjalda fyri fiskin.

Tað var eisini húsagangur á Tvøroyri, og tá var tað, at fakfeløgini stovnaðu AT, Arbejdernes Trawlerdrift.

Løgtingið heitti á statin um stuðil í hesi støðu, og tað endaði við 0,9 mill í stuðli og 0,3 mill í láni.

Einki skip slapp út aftaná várið 1936, uttan at teir høvdu "útrustningslán". Tað var gott fyri mannskapið, tí teir fingu sama prís sum reiðaríið, og teir fingu pengarnar.

Tað var eisini hetta árið, at Føroya Fiskaexport varð stovnað við statsstuðli. Endamálið við hesum tiltaki var at samskipa útflutningin, so teir einstøku útflytararnir ikki vórðu spældir út mót hvørjum øðrum. Tískil fingu teir eisini einarætt til útflutning av fiski. Magnus Dahl í Vági var formaður. Eg var limur, tí eg átti jú skip.

Magnus Dahl, sum sat á tingi fyri sambandsflokkin, hevði verið hjá amtmanninum og ført fram, at føroyingar áttu rættindi sum borgarar í danska ríkinum. Men Hilbert hevði sagt, at var tað nakað um politikk, so høvdu teir einki at tosa um.

Fiskaeksport varð tikið av aftaná kríggið, og Fiskasølan stovnað. Tá skuldi ein skilamaður siga, at hon fór at koyra landið á heysin, og so varð í ein ávísan mun.

### 1937

Vit fóru so at rógva út við báti árið eftir og settu línuspæl í "Guide Me". Tað gekk framvegis einki, og tað vóru so ringar tíðir. Eg slapp mær av við hann. Eg tordi ikki at halda áfram. Tveir brøður mínir vóru við, og hetta bar ikki til. Eg fekk onga fortjenastu, og teir fingu einki heldur. Men eg slapp tó nokkso snikkaleysur. Eg hevði eitt lán í bankanum, og bank-

Framhald á næstu síðu

FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
Nr. 378 - 9. november 2006

in seldi bátin til Íslands. Eg fekk ikki fleiri krøv. Poul Hansen reiddi hann út, og hann var hampiligur. Hetta var í 1937.

### Fór við "Hjørdis" í 1938.

Tá fór eg við "Hjørdis" hjá S P Petersen í Fuglafirði. Hon var upkallað eftir Hjørdis hjá S.P. Petersen, yngra, Pidda. Christian Danielsen í Kvívík var skipari. Hann var pápi Birgir Danielsen, sum var í Fiskasøluni. Bestimenn vóru Jørgen Danielsen, beiggi hansara, og 2. bestimaður var Sofus Rinkustein hiðani. Maskinmenn vóru Hendrik Hammer, pápi Óla á Smyril Line, og Laurits, sum var ein vágamaður. Christian førdi "Hjørdis", frá tí hon kom til landið í 1930 og inntil 1951. Hon brendi í 1955 í Grønlandi.

Tað var hetta várið, at "Fossanes" fórst á Suðurlandinum við 19 monnum. Hetta hendi í einum øgiligum illveðri, sum m.a. Malmberg Simonsen úr Sørvági hevur fortalt um her í blaðnum. Men tað var so heppið, at vit vóru slett ikki farnir avstað. Hetta var eitt slíkt illveðursvár, og tað man hava hildið okkum frá at fara. Tó minnist eg ikki, at veðrið var so ringt í Føroyum, sum tað var í Íslandi.

Tað hevur verið nakað av ógreiðu um, hví "Fossanes" fór, men eg havi eins og aðrir hoyrt, at hann varð ásigldur av enskum trolara. Ein trolari kom inn í oyggjarnar, og har var skilligt merki av ásigling. Eg var seinni saman við manni úr Vestmannaoyggjunum, sum við troli var komin fastur í vrakið av "Fossanesi". Tað lá millum sandin og landið.

Á Suðurlandinum gekk illa. Tað var einki skip, sum fekk nakað munandi av fiski. Av øðrum hevur verið sagt, at hetta illveðrið hevði fingið ólag í sjógvin og harvið fiskiskapin. At hugsa sær til, vit fingu 150 skippund, og vit vóru 32 mans. Miðlingar lógu um 70 kr. fyri túrin. Hvussu man hava verið vorðið hjá familjumonnum? "Hjørdis" tók annars 1.000 skippund.

"Polarfarið" hjá Gudda á Dalinum var besta skip á Suðurlandinum hetta várið, hann fekk 400 skippund. Tá var ringt at vera reiðari, teir høvdu tað líka ringt sum tann meinigi maðurin.



*Hans Jacob Abrahamsen, skipari á Sæborg, saman við sínum 10 børnum.*



*Andreas sigldi eisini við "Hjørdis".*

### Til Grønlands

Síðan fóru vit til Grønlands við línu. Hetta var sera hart, tí línan mátti dragast við hond. Tá dugdi man heldur ikki rættiliga at fáast við línu. Menninir máttu skiftast um at draga. Tað mátti eisini setast við hond, sum tað plagar at verða sagt. Hetta var áðrenn tíðina við stampum, tá línan sjálv rann út. Nýtt varð trog sum í gomlum døgum. Men longdin av línu hevur ikki verið tann sama sum seinni.

Seinni fóru vit so inn í fjarðirnar at rógva við bátum, sum vit hava havt við okkum. Tað vóru annars fleiri føroysk skip, sum gjørdu hetta. Dømi um hetta er "Normanner", har vit hava havt frásøgn hjá Sverra Rasmussen á Skála.

Men vit fingu so 1.000 skippund. Ein slíkur túrur gav eisini hampiliga nógv í inntøku.

Hetta var um ta tíðina, tá poltikkurin var, at grønlendingar skuldi verjast móti útlendskari ávirkan. Tí var tað forboðið at hava meira enn neyðugt samband við grønlendingar. Tað var soleiðis ikki loyvt at fara inn í eina grønlendska bygd. Eg minnist einaferð, at lækni kom umborð úr Holsteinsborg. Hann kom við báti, sum var mannaður við grønlendingum, men prát mátti einki vera.

Tað var hetta árið, at Føroya Skipara og Navigatørfelag lat prenta sítt "Opråb til det danske Folk", har greitt varð frá viðferðini, sum føroyskir fiskimenn fingu í Grønlandi. Har var hildið, at tað vóru danskir myndugleikar, sum settu grønlendingar upp ímóti føroyingum.

Vit hava tikið nakrar talvur úr hesum bóklingi, og geva hesar eina góða lýsing av fiskiskapinum tá í tíðini.

### Stakkals "Isabella"

Síðan er tað Isabella, har var Napoleon Christiansen úr Leirvík skipari. T.F Thomsen á Tvøroyri átti hana. Hetta var ein slupp, sum seinni gjørdist til "Álaker", og sum eg kom at sigla nógv við. Hon hevði lítlan motor, og tað gekk ikki gott við henni. Vit fingu lítið av fiski tey árini. Tey flentu at reiðaranum, sum plagdi at siga:"Stakkals Isabella". Vit fiskaðu undir Íslandi, sum vanligt var, og eg var 2.bestimaður við.

### Kríggið

Nú koma vit til kríggið. Fyrsta túrin, eg var niðri, var í 1941 við "Honnu", sum var ein skonnart úr Vestmanna, sum Aksel Hansen átti. Hann var beiggi Poul Hansen, sum eisini var ein kendur reiðari. Møguliga áttu teir hana saman. Vit tóku fisk í Fuglafirði. At eg kom við, tað kom av tí, at eg hevði sagt við Poul Hansen, at var nakar kjansur, mátti hann siga mær frá. Nú liggur hon og tekur fisk á Fuglafirði. Skipari er Karl hjá Birtu Liasi í Vágum, sum búði heima á Sandi. Meðan lossað verður, fær bestimaðurin boð um, at sonur hansara er deyður. Hann hevði funnið onkran lut í fjøruni í Vestmanna sum sprongdust við hesum vanlukkuliga úrslitinum. Hann mátti so til hús, og eg varð biðin um at fara fyri hann. Vit komu aftur í øllum góðum, men tað var landsynningur, og tað var ringt at fara forbí "hjørnið" á farleiðini. Vit skuldu fara til Fleetwood vestantil í Skotlandi við fiskinum. Hetta tók so langa tíð vegna veðrið. Vit vóru millum londini um ta tíðina, tá t.d. "Næraberg" varð søktur. Ein dagin, eg standi frammi á bógnum, tá kemur ein trolari framvið í stýriborð beint á kósina hjá okkum. Hetta kann saktans hava verið "Næraberg".

Tá vit nærkast Hebridunum, koma vit í eina konvoy. Sum tað var óhugnaligt. Lanternurnar brendu petroleum, og tað var segldúkur fyri, og tá man kom móti einum skipi, mátti man taka segldúkin frá. Men teir tendraðu lanternurnar. Tað var akkurát sum fjøll at síggja. Tað var óhugnaligt. Hanna kom ígjøgnum tvær konvoyir. Onnur av hesum var í írska havinum.



*Gamli Sámal Petur í Fuglafirði var reiðarí á "Hjørdis".*

Vit høvdu ein kokk, sum var eldri maður. Eg veit ikki, um hann svav nakrantíð á túrinum. Eg var ungur og í góðum árum, so tað bilti ikki hjá mær. Vit komu so til Fleetwood, og tað var ringt lag á fólkinum í Onglandi tá, tí hetta var beint, tá bretar vóru riknar aftur av týskarum í Afrika. Vit hoyrdu eisini hesi tíðindini í útvarpinum úr London. Hetta ávirkaði eisini søluna hjá okkum. Vit fingu vánaligan túr. Fiskurin var eisini ov gamal. Tað var fyrsti túrurin hjá "Fimm Systrum", hjá Símun Dáva á Húsum, sum eisini seldi tá. Hann hevði júst sett nýggjan motor í hana. Evald Kjølbro hevði hana saman við Símun Dáva. Teir seldu gott, men við nýggja motorinum høvdu teir eisini styttri sigling, og tí var fiskurin tað betri.

Vit fáa nú ordrar um, at vit bæði skipini skuldu fylgjast upp aftur. Vit vistu einki um hesi føroysku skipini sum vóru søkt. Og vit skuldu sigla sama vegin heim, sum vit komu, nevniliga innanfyri Hebridurnar. Tá vit koma norður ímóti Hebridunum, hava teir á Fimm Systrum tikið feil av vitunum. Teir vóru farnir vesturum Hebridurnar. Tá hetta verður varnast, seta vit bátin út og fara umborð á "Fimm Systrar" at vita, hvat vit skulu gera. Teir vórðu so samdir um at halda eftir bankanum og tann vegin, og var hetta tískil ímóti ordrum. Men hetta eydnaðist væl, og vit komu aftur í øllum góðum.

"Hanna varð" so løgd

Í komandi parti koma greiðir Andreas millum annað frá tíðini, hann sigldi fyri amerikanarar og bretar í Íslandi undir krígnum.

# Fiskivinnuframsýning í Sisimiut



Grønland er eisini uppi í parti, tá tað snýr seg um fiskarímessur. Tískil opnar Polarfish framsýningin 17. november í Sisimiut ella Holsteinsborg, sum er gamla navnið. Hetta hóskar væl til, at býurin verður 250 ár í ár. Í býnum búgva um 6.000 fólk, og er hann tann næststørsti í Grønlandi. Í býnum er størsta rækjuverksmiðjan í Grønlandi, sum samstundis er heimsins mest nútímans rækjuverksmiðja.

Hetta er annars fimtu ferð, at messa verður hildin í Sisimiut

Grønlendska messan umfatar 1000 fermetrar, og hetta er ikki nógv í mun til aðrar stórar messur, men roynt verður at fáa mest møguligt burturúr, m.a. við at hava smærri básar. Teir verða 65 í tali, so tað skuldi verið nóg mikið at sæð hjá einum og hvørjum, sum hevur áhuga í fiskivinnu. Tað verður roknað við nógvum luttakarum. M.a. kemur eitt "messuflogfar" beinleiðis úr Canada.

Føroyingar verða eisini umboðaðir, og føroysku fyritøkurnar verða: Oilwind, Awi Boats, Menningarstovan, Klaksvíkar Kommuna, FJM, Tórshavnar Skipasmiðja, North Atlantic Fish Fair, Petur & Petur, MP Teknik, Klaksvíkar havn, Klaksvíkar Kommuna, O. C. Joensen, Sjóvinnuskúlin í Klaksvík. Annars eru framsýnarar úr Grønlandi, Danmark, Íslandi, Canada, Bretlandi og Noregi.

Vit koma at frætta frá hesi framsýning. Vit hava jú okkara mann í Grønlandi, Kára við Stein, á staðnum. Hann fer á framsýningina og fer at greiða frá tí, sum verður at síggja her. Hann plagar at vera sera tíðindafróður.



# Marjun og Símun Johan havt gullbrúðleyp

Seinasta leygardag hildu Marjun og Símun Johan Wolles á Eiði teirra 50 ár hjúnarbandsdag. Sjálvur dagurin var tann 20. oktober, men vegna deyðsfall í familjuni varð haldið útsett. Tað var hildið í "Mizpa", sum hevur verið ein stórur partur av lívinum hjá teimum báðum, og her vóru hendan dagin nógv fólk, sum heilsaðu gullbrúðarparinum.

Her skal ikki sigast so nógv um søguna hjá teimum báðum. Hana høvdu vit, tá Símun Johan fylti 70 ár, og sæst hon á okkara heimasíðu, blað nr. 289.

Stutt sagt eru tey bæði ættað úr grannahúsum á Trøllanesi, og hetta er ein uppruni, sum ikki fornoktar seg, og sum eisini sæst á myndum inni hjá teimum.

Símun Johan hevur verið tann, sum nógv fólk hava kent, partvíst sum talari á møtum hjá Brøðrasamkomuni gjøgnum hálva øld, og partvíst sum bátasmiðurin og frásøgumaðurin.

Hesum hava vit havt nógva gleði av við øllum teimum frásøgnum hjá Símun Johan, sum vit hava havt her í blaðnum. Serliga vilja vit nevna ta áhugaverdu útróðrar- og bátasøguna av Eiði, sum hann hevur skrivað, og sum vit prentaðu í trimum pørtum fyri nøkrum árum síðani.

Hóast Marjun hevur verið tann minna sjónliga, so hevur hennara leiklutur ikki verið av minni týdningi. Hon hevur verið tað trygga og fasta baklandið, sum hevur tryggjað jarðarsambandið hjá teimum báðum.

Fyri júst 25 árum síðan fekk eg sjálvur konu av Eiði og eri javnan komin higar. Tað eru nøkur hús, har eg fast komi inn í á Eiði, og eitt av teimum er í Miklagarði hjá teimum báðum. Tað er næstan, sum ikki at hava verið á Eiði, uttan at hava vitjað tey.

Her er talan um eitt heim í orðsins sanna týdningi. Øll føla seg væl. Higar koma gestir úr samkomum í øllum landinum. Tað er eisini gott samanhald í familjuni, sum er stór í bæði borð, og tey koma javnan á vitjan. Øll kenna seg vælkomin í teirra hugnaliga heimi, har vit eisini hava fingið mangt prátið um okkara felags áhuga, Trøllanes, fyri ikki at tala um allar drekkamunnarnar.

Sjálvi eru tey eisini trúføst at vitja onnur, ikki minst míni verforeldur, sum nú eru gomul og skerd.

Stutt sagt kann sigast, at tað hevur verið gevandi og stuttligt at kenna tykkum bæði og tykkara, og enn einaferð verður ynskt tykkum hjartaliga tillukku við tykkara stóra degi!

*ó.*

**Tær bestu og bíligastu loysnirnar uppá**

| | |
|---|---|
| GDMSS-Radioútgerð | Furuno/Silor/JRC/I-Com |
| Radar við ARPA og Plottara | Furuno/Simrad/JRC |
| Ekkolodd-útgerð | Furuno/Simrad/JRC |
| Sonara-útgerð | Furuno/Simrad/kaio- |
| Navigatións-útgerð | Furuno/Simrad/JRC |
| Navigatións Plottara | Furuno/MaxSea/Simrad, Sodena |
| Autopilot - stór og lítil skip | Furuno/Robertson/Sperry |
| Autopilot - til bátar | Timco |
| Satellite Kumpass - 3xGPS | Furuno |
| Satelitte - Navigation | Furuno/Simrad/JRC |
| Satelitte - Kommunikations | Furuno/T&T/Sailor |
| Satelitte - Sjónvarp | Applied/Sea Tel |
| Trol-sensorar og kabinett | Scanmar/Simrad |
| Gyrokumpass | Sperry/C-Plath/Anschutz |

**Søla og service:**
*Sjálvandi hava vit útgerð til GMDSS SÝN og Service, sum vit eisini gera*

***Sp/f Contrive Jsp Ltd.***
**FO-700 Klaksvík, Tlf.: 455244 - 214244, Fax: 456945**

**MAN B&W Diesel A/S**

Umboðið · Ernst Reinert

**Alpaha Diesel** motorar og eykalutir

Undir Glaðsheyggi 10
FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tlf: +298 31 33 84 · Fax: +298 31 30 64

ALT TIL
ÚTRÓÐRARMANNIN

**GUMMIBÁTATÆNASTAN hevur tað, tú hevur brúk fyri**

Vit hava gummibátin, termodraktina, bjargingarvestin, handskarnar og meginpartin av tí, tú hevur brúk fyri.




**GUMMIBÁTATÆNASTAN**

31 49 13 | Mannaskarð 4 | FO-110 Tórshavn | gbt@gbt.fo | www.gbt.fo

## Suez-kreppan í 1956:

# Tá Menakhem var við til at bjarga seinastu jødunum úr Egyptalandi

**Jødar hava eina langa og drúgva søgu í samband við Egyptaland. Her kunnu vit bert fara aftur til bíbliusøguna, sum er ein munandi partur av søguni hjá jødunum, og sum vit onnur kenna so væl eisini.**

Loypa vit fram til 1948, tá Ísrael varð sett á stovn, vóru 75.000 jødar, sum búðu í Egyptalandi. Tað kríggj, sum arabisku londini tá førdu ímóti Ísrael, fekk eisini avleiðingar fyri jødar í Egyptalandi. M.a. varð teirra býarpartur í Kairo bumbaður við tí úrsliti, at 70 vórðu dripin og nærum 200 vórðu særd.

Okkara bussførari í Ísrael var ein partur av hesi søgu. Hansara foreldur rýmdu úr Egyptalandi aftaná hesar hendingar og komu seinni til Ísrael. Tað var ikki longur livandi hjá jødum, so teir flestu fluttu burtur longu tá.

Í 1956 vóru gott 25.000 jødar eftir í landinum. Tá kemur Suez-kreppan, sum byrjaði við, at Egyptaland tjóðartók Suezveitina frá Frankaríki og Bretland, sum áttu hana. Tað førdi til, at hesi londini lupu á Egyptaland við hermegi fyri at fáa veitina aftur. USA og Sovjet vóru hart ímóti hesum átaki og fingu steðgað tí eftir fáum døgum gjøgnum ST.

Ísrael gjørdi sær dælt av hesi støðu við at hertaka Sinai fyri at fáa sína ávirkan á, hvat ið fór at henda. Teir høvdu einki at tapa, tí skip úr Ísrael sluppu kortini ikki gjøgnum veitina undir egyptiskum ræði. Afurat hesum hevði Egyptaland stongt Ísreal úti frá Reyðahavinum, og týdningarmila havnarbýnum Eilat. Hetta var í sær sjálvum roknað sum ein krígsavbjóðing. Ein óætlað avleiðing av Suezkreppuni varð, at Nasser gjørdist hetja í arabiska heiminum, tí hann tordi at seta seg upp ímóti stórveldunum Bretlandi og Frankaríki, og søgumenn meta, at hetta kann hava skundað undir tey kríggini í Miðeystri, sum komu seinni.

### Jødar í Egyptalandi lýstir sum fíggindar

Hetta kom eisini teimum jødum, sum enn vóru í Egyptalandi, aftur um brekkur. Teir flestu av teimum vórðu vístir av landinum, og stjórnin legði hald á teirra ognir. Umframt hetta vóru 1.000 jødar sendir í fongsil ella fangalegur. Tann 25. november 1956 boðaði egyptiski ráðharrin fyri átrúna frá í eini fráboðan, sum var lisin í øllum moskum í landinum, at "allir jødar eru zionistar og fíggindar av statinum", og hann lovaði, at teir skjótt fóru at verða vístir av landinum, og varð hetta eisini gjørt. Teir fingu bert loyvi til at hava við sær eittans kuffert og eina lítla peningaupphædd. Síðan vórðu teir noyddir at skriva undir eina váttan um, at teirra ognir skuldu latast egyptisku stjórnini sum ein "gáva". Útlendskir eygleiðarar kundu boða frá, at limir í jødiskum húskjum vórðu tiknir gíslar fyri at tryggja sær, at tey, sum fóru av landinum, ikki skuldu tora at tosa ímóti egyptisku stjórnini. Úrslitið av hesum og øðrum atgerðum var, at tað í 2004 vóru minni enn 100 jødar í Egyptalandi.




*Hetta kortið lýsir gongdina í Suezkreppuni, sum henda greinin snýr seg um.*

### Avrikið hjá Menakhem

Menakhem Ben Yami, sum hevur verið við nógvum søguligum hendingum hjá Ísrael, átti eisini ein leiklut her. Hann var nevniliga við til at flyta hóttar jødar úr Egyptalandi í 1956.

Menakhum gjørdist tíðliga fiskimaður og eisini fiskiskipari. Hetta metti hann at vera eitt dreymaarbeiði, har alt er upp til skiparan, hvat skal henda. Hetta er munurin millum at vera skipari á einum farmaskipi og einum fiskiskipi. Tann á farmaskipinum skal sigla frá havn A til havn B, meðan tað er - ella var - heilt upp til fiskiskiparan, hvar hann skuldi fara fyri at fáa mest burturúr.

Ein dagin seinast í 1956



*Egyptiski jødin og egyptiski kristni arabarin kundu tosa egyptiskt saman í brøðrasamkomuni í Nazaret.*



*Tað vóru trolarar sum hesir, sum fóru til Egyptaland.*

fær hann saman við einum øðrum skipi boð frá myndugleikunum um at fara til havs og at sigla eina ávísa kós. Vegna krígsvandan var skipið útgjørt við vápnum at verja seg við. Við sær fekk hann eisini ein forseglaðan brævbjálva, sum ikki skuldi opnast fyrr enn, teir vóru komnir út á vítt hav. Á kósini skilti hann kortini, at hon gekk ímóti Port Said í Egyptalandi, sum liggur við innsiglingina til Suezveitina.

Tá brævbjálvin verður latin upp, kann hann lesa, at uppgávan er at bjarga nøkrum av teimum hóttu jødunum úr Egyptalandi. Men hetta kravdi sínar fyrireikingar. Skipið skuldi fyrst broytast frá at vera ísraelskt til at vera italienskt, so tað skuldi vera lættari at koma inn í egyptisku havnina. Tað fyrsta var at geva skipinum nýtt italienskt navn, sum skuldi málast útyvir tað upprunaliga navnið. Tað sama var við skrásetingarnummarinum. Við tær høvdu teir eisini fingið eitt italienskt flagg, sum skuldi í húnar hátt. Orsøkin til, at skipið skuldi gerast "italienskt" var, at hetta var tað lættasta fyri ísraelsmenninar. Nógvir av teimum vóru upprunaliga ókendir við fiskiskap, tá teir komu til Ísrael. Lærdómin at fiska fingu teir við at sigla við italienskum fiskiskipum, sum greitt frá í greinini um fiskiskap í Ísrael. Har lærdu nógvir teirra eisini at tosa italienskt, so nú kundu teir eisini bluffa við málinum, um tørvur varð á tí.

Tá umskiftið var liðugt, máttu teir krógva øll vápnini, so tey í hvussu er ikki kundu síggjast av øðrum skipum. Síðan varð eitt trol hongt uppí mastrina, so eingin skuldi ivast í, at talan var um eitt fiskiskap, og síðan varð siglt móti Port Said, har ørindini skuldu vera at taka olju og útgerð.

### Heimsføðisligir italienskir fiskimenn

Í Port Said lá ein heilur floti av fronskum og bretskum herskipum, sum bert bíðaðu eftir boðum at leypa á. Teir undraðu seg yvir, hvat hetta lítla italienska skipið mundi vilja her júst í hesi støðu. Teir vórðu eisini spurdir, um teir ikki vistu, at tað var kreppa og kanska kríggj. Nei, hetta vistu teir einki um. Teir komu úr eini bygd á Sisiliu, har einki frættist, og teir vistu einki um heimspolitikk!

Teir koma so inn í Port Said, og her gekk alt uppá



*Menakhem sum ungur marinari.*

stás. So væl var fyriskipað, at eingin egyptari hevði frænir av nøkrum, og teir vóru eisini upptiknir av øðrum enn italienskum fiskimonnum. Jødarnir, sum skuldu flytast, vistu frammanundan, hvat ið skuldi henda, og teir bíðaðu heima við hús eftir nærri boðum. Tá skipini komu í havn, fóru boð hús úr húsi. Tá fóru øll oman á kaiina og umborð, uttan at nakrar óraði óráð.

Av flóttarfólkunum vórðu so nógv koyrd í lastina, sum pláss varð fyri. Hini mátti leggja seg á dekkið, har presendingar vórðu lagdar útyvir, eins og tað kundi verið gjørt við einum fiskiskipi. So var farið avstað aftur og siglt varð fram við stóra herflotanum, uttan nakað sum helst.

Hetta var seint á árinunum, og veðrið var ikki so gott. Nógv av fólkunum fingu eisini sjóverk, so hetta hevur ikki verið nakar stuttleikatúrur.

Men eftir 11 tímum komu tey fram til Haifa, og so var sloppið. Fyri nøkrum árum síðani varð skipað fyri eini samkomu av hesum jødunum saman við teirra bjargingarmonnum, og var hetta eisini ein minnilig stund.

Seinni kom Egyptaland at ganga á odda at fáa skipaði viðurskifti við Ísrael. Samstundis eru viðurskiftini hjá teimum fáu jødunum, sum eru eftir, bøtt. M.a. hava teir nú aftur fingið sína egna synagogu.

Hetta er so bert eitt lítið dømi um, hvussu tað hevur verið neyðugt hjá ísraelsmonnum at bjarga sær úr truplum umstøðum.

# Fulltrúi/ráðgevi í Løgtinginum

**Í umsiting Løgtingsins er eitt starv sum fulltrúi ella ráðgevi leyst at søkja.**

**Arbeiðsuppgávurnar hjá fulltrúanum/ráðgevanum verða hesar:**

- Nevndarskrivari og løgfrøðiligur ráðgevi í 3 tingnevndum
- Eftirkanna lógaruppskot og vera løgfrøðiligur ráðgevi hjá flokkum og tingmonnum í málum, sum natúrliga hoyra til omanfyrinevndu nevndir
- luttaka í vanligari málsviðgerð í umsiting Løgtingsins, og eru uppgávur hennara í stuttum hesar:
  - at taka sær av øllum umsitingarligum uppgávum Løgtingsins
  - at vera ráðgevi hjá Løgtingi og løgtingsnevndum í øllum løgfrøðiligum spurningum, herundir at ansa eftir, at øll mál eru løgfrøðiliga og málsliga røtt
  - at røkja skrivarauppgávur í Løgtinginum og løgtingsnevndum
  - at taka sær av skrivarauppgávum hjá Løgtingsins sendinevndum í Norðurlandaráðnum og Útnorðurráðnum

Í umsiting Løgtingsins arbeiða í løtuni 11 fólk, harav 2 løgfrøðingar.

Tann, sum settur verður, skal hava lokið prógv í løgfrøði. Tann, ið settur verður, skal hava áhuga fyri politiskum og samfelagsligum viðurskiftum.

Fólk, sum hava lokið útbúgving í summar ella vænta at verða liðug í januar, eru vælkomin at søkja.

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og BLF.

Tann, sum settur verður, má tola broytingar í arbeiðsuppgávunum.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Løgtingið, telefon 311000, Súsonnu Danielsen, stjóra.

Umsóknir saman við prógvum, frágreiðing um størv frammanundan og møgulig ummæli skulu vera umsiting Løgtingsins, Tinghúsvegi 1-3, Postboks 208, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi týsdagin, 21. november 2006, kl. 16.00.

***Løgtingið, tann 3. november 2006***


# Ja takk!

**Eg ynski at gerast haldari av FF-blaðnum fyri einans 250 krónur um árið**

Verður sent ópostað
(vit gjalda postgjald)

Navn: ____________________

Bústaður: ____________________

Bygd/býur: ____________________

**FF-blaðið - postsmoga 58 - FO-110 Tórshavn**

**Vit eru at hitta á tlf. 31 15 69 ella fax 31 87 69**
**fo-fisk@post.olivant.fo · www.fiskimannafelag.fo**


# Felagsformansval

Í ár er felagsformansval í Føroya Fiskimannafelag. Um uppstilling og val sigur lóg felagsins:

*Við vali av felags- og sýsluformonnum hevur hvør sókn rætt til at stilla upp ein mann. Við vali av felagsformanni hava eisini limirnir á teimum skipum, sum eru burtur, tá uppstillingin fer fram, rætt til at stilla upp ein mann. Maður er uppstillaður sum felagsformansevni, um 5 sóknir/skipsmanningar skjóta hann upp.*

*Valini eru loynilig og fara fram eftir reglum, sum felagsstjórnin ásetur. Skipast skal so fyri, at limir, sum eru burtur, meðan valið fer fram, skulu hava høvi til at greiða atkvøðu.*

*Atkvøðuseðlarnir verða sendir grannskoðara felagsins, sum telur atkvøðurnar upp.*

*Allir formenn verða valdir fyri trý ár í senn, og tekur valskeiðið við 1. februar.*

Felagsstjórnin hevur annars ásett hesar reglur fyri val:

Viðvíkjandi uppstilling:

a. Boð um uppstilling verða send sóknum og skipum fyrst í november. Fráboðanin fer eisini fram í FF-blaðnum.

b. Seinasta freist at boða frá uppstilling er 4. desember kl. 16, og skal uppstillingin vera váttað av sóknarformanni ella álitismanni hjá manningini tá talan er um skipsmanning.

Viðvíkjandi vali:

a. Valrætt hava teir fiskimenn, sum hava goldið limagjald fyri 2005/2006, ella sum í 2006 eru mynstraðir og verða avroknaðir eftir sáttmála millum Føroya Reiðarafelag og Føroya Fiskimannafelag, tó skiparin undantikin.

b. Felagsskrivstovan sendir áðrenn valið sóknarformonnunum yvirlit yvir fiskimenn við atkvøðurætti.

c. Á atkvøðuseðlinum verða prentað nøvnini á valevnum. Hesin skal koyrast í ein brævbjálva. Aftanfyri skal skrivast navn, bústaður, føðingardagur og seinasta skip og tíðarskeið, viðkomandi hevur verið við. Brævbjálvin skal sendast beinleiðis til grannskoðara felagsins.

d. Sóknarformenninir skipa fyri valinum, soleiðis at teir býta atkvøðuseðlarnar út til limirnar og so vítt gjørligt heinta teir. Í sóknum, har tað av praktiskum ella øðrum orsøkum ikki ber til at nýta hesa mannagongd, verða atkvøðuseðlarnir sendir beinleiðis til limirnar við postinum. Hesir senda teir beinleiðis aftur til grannskoðara felagsins.

e. Har sóknarformenninir skipa fyri valinum verður samsýningin kr. 7 pr. fiskimann við atkvøðurætti.

f. Atkvøðuseðlarnir skulu vera grannskoðara felagsins í hendi í seinasta lagi 30. januar.

g. Fiskimenn, sum eru burtur, meðan valið fer fram, fáa atkvøðuseðil sendandi umborð.

h. Mannagongdin við valinum verður lýst í bløðunum.

# Álitismenn

Reglurnar í viðtøkum FFs um álitismenn siga:

*Umborð á skipum eigur manningin at velja sær ein álitismann, sum skal vera millummaður millum skipara og manning og á annan hátt vera talsmaður manningarinnar.*

*Álitismaðurin skipar, t.d. eftir reglum, sum felagsstjórnin fyrisetur, fyri uppstilling og val umborð á skipum, sum ikki eru heima, meðan val fara fram.*

Hetta merkir, at vit samstundis skulu hava váttan um val av álitismanni hjá manninini.

# Føroya Fiskimannafelag 95 ár

Føroya Fiskimannafelag varð stovnað 14. november 1911. Hetta er júst fyri 95 árum síðan, og tískil er talan um ein hálvrundan føðingardag, har vit kunnu støðga eitt sindur á, og vit fara í hesum og komandi blaði at tríva í søguna og virksemið hjá felagnum hesa knappu øldina.




*Hetta minningarrit gav FF út í samband við 25 ára haldið í 1936. Tað var skrivað av Rasmus á Háskúlanum, sum var skrivari felagsins frá 1911-1936.*

Vanligt var í londunum uttanum okkum, at fyrst vóru fakfeløg stovnað, og síðan komu arbeiðsgevarafeløg aftaná. Men hjá fiskimonnum var øvugt. Reiðarafelagið varð stovnað í 1908 við tí endamáli at fáa eins sáttmálar fyri allan flotan, og ein slíkur varð eisini gjørdur av teimum.

Men har bert annar parturin ger ein "sáttmála", kemur skjótt slagsíða í, og tað hendi eisini her. T.d. varð sagt, at manningin skuldi bera sín part av *"alle Slags Udgifter til Anskaffelse af Agn og dets opbevarelse om Bord"*.

Henda orðing varð ymist uppfatað av reiðarum. Summir lótu tað vera uppfylt við keyp av sild til agn og keyp av ísi til at goyma hana í. Aðrir tóku eisini fyri ískassar, frystipannur, byrsur, lóður, ja, enntá bátar, sum vóru nýttir til at skjóta fugl til agn, inn undir orðingina.

### Gøtumenn tóku fyrsta stigið

Hesa tíðina var ein rættiliga uppvaktur ungdómur í Gøtu, sum plagdi at hittast, meðan teir vóru heima um veturin, at tosa um, hvussu bøtast kundi um umstøðurnar í bygdini. Millum tað, sum teir tóku stig til, var telefon og vatn. Men fundirnir vóru so hulisligir, at felagið millum manna varð kallað "huldufelagið". Samstundis høvdu gøtumenn fingið ein rættiligan framburðsmann til lærara, nevniliga Símun Pauli úr Konoy. Hann man hava verið íblásturin, tá uppskot kom fram í huldufelagnum um at fara undir at stovna eitt fiskimannafelag. Sum sagt so gjørt. Bræv varð sent til hvørja bygd í desember 1910, og hetta førdi stovningina av felagnum.

Tað er hugvekjandi at síggja, hvussu nógvir av teimum kendu "høvdingunum" frá fyrst í hini øldini, vóru við uppi í felagnum so ella so. Í fyrstu bráðfeingisnevndini vóru Janus Djurhuus, Rasmussen Rasmussen, sum gjørdist skrivari í felagnum í 35 ár, S. P. úr Konoy, sum gjørdist fyrsti formaður, og sum sat í 15 ár og A. C. Evensen, prestur. Einasti fiskimaður var Jens S. Jensen av Stykkinum, sum annars var pápi Brimnes prest. Av øðrum kann nevnast Mikkjal á Ryggi, sum var sýsluformaður fyri Vágar eitt skeið.

### Felagið fór sundur og saman aftur

Tað ber ikki til at taka alla søgu felagsins við í hesi frásøgn. Tað fara vit seinni at koma aftur til. Men tað hevur sjálvsagt gingið upp og niður. Ofta hevur verið rættiliga buldrasligt. Í 1934 fór felagið í tvíningar, tá fiskimenn í Suðuroy tóku seg burtur úr felagnum. Men, "ótypiskt" fyri føroyingar, samdust teir aftur og løgdu feløgini saman aftur í 1957.

Krígsárini vóru ein hørð tíð hjá fiskimonnum vegna tey mistu skipini og mannalívini. Tíðin aftaná kríggið gjørdist eisini hørð vegna fíggjarligu kreppuna, sum tá rakti samfelagið. Hetta førdi til tey stóru verkføllini fyrst í 50-unum, sum á mangan hátt broytti hugburðin hjá fiskimonnum og eisini samfelagnum annars.

### Virksemið í nýggjari tíð

Tað, sum eg sjálvur minnist best til, er sjálvsagt seinastu 40 árnum, sum eg havi verið stjórnarlimur og valdur formaður í felagnum. Tað skal sigast, at dentur hevur verið lagdur á, við sakliga undirbygdum sjónarmiðum, "stig fyri stig" at vinna fiskimonnum og sjómonnum betri og tryggari vilkor. Nógv orka hevur eisini verið løgd í at virka fyri broytingum í vinnuni, sum kundu koma øllum samfelagnum til góðar.

Tá leikluturin hjá felagnum, tá tað snýr seg um nakað positivt, ikki fer at koma í almennu søgubøkurnar, skal okkurt av tí takast fram her.



*Fiskimannafelagið hevur havt nógv altjóða samband seinastu nógvu árini. Her er Óli Jacobsen á veg inn á gólvið hjá fiskivinnuumsitingini í Haifa í Ísrael.*

### Starvsviðurskifti fiskimanna

Tað, sum er avgerandi fyri inntøkur fiskimanna, er fiskanøgd, prísir og sáttmálin. Bøtt hevur verið um sáttmálan stig fyri stig, soleiðis at hann yvirhøvur gevur fiskimonnum rímiliga inntøku.

Tað sama er við inntøkutrygdini hjá fiskimonnum, har hon er so rímilig, sum hon kann vera. Tað er eydnast at útvega fiskimonnum eina skipan fyri skatting, sum gevur teimum samsýning frá samfelagnum fyri teirra stríð og strev.

### Marknaðarbúskapur í flakavinnuni

Viðvíkjandi ráfiskaprísum hevði Føroya Fiskimannafelag eina heilt avgerandi ávirkan á skiftið til marknaðarbúskap í fiskiídnaðinum á landi. Fram til endan av 80-unum vóru flakavirkini stýrd eftir einum planbúskapi, sum líktist tí sovjetiska. Tann, sum hevði minst at siga á einum flakavirki, var leiðslan á sjálvum virkinum. Úrslitið gjørdist eitt fíggjarligt óføri. Her kom FF á fiskivinnutingi í 1986 við einum ítøkiligum uppskoti um eina prísásetingarskipan, sum skuldi geva virkjunum sjálvum áhuga fyri at fáa sum mest burturúr. Málið kom í drag, men tað er greitt, at FF orðaði í 1988 ta lógarbroyting, sum ársskiftið 1989/1990 byrjaði ta kappingina um fiskin, sum í dag gevur fiskimonnum prísir, sum teir ikki høvdu droymt um. Og frá tí lógin varð samtykt, og til hon varð sett í verk, nýtti FF nógvar kreftir at sannføra partarnar í vinnuni við tí skilagóða at sleppa "koddaskipanini", sum var, og at leggja um til eina skipan, har tað var upp til virkini sjálvi at fáa "profitmaksimering".

Hetta var grundarlagið fyri teirri kapping um fiskin, sum vit hava sæð árini aftaná, og sum hevur gjørt tað, at virkini sum frá leið kundu gjalda munandi meira fyri fiskin uttan studning enn teir gjørdu frammanundan við nógvum studningi.

Henda gongdin er eisini stuðlað av Fiskamarknaðinum, har vit hava verið partaeigarar, og har vit hava havt ein virknan leiklut. Ikki minst eiga vit hampiliga stóran part av teirri umlegging av Fiskimarknaðinum, sum varð framd fyri tveimum árum síðani, og sum er enn ein styrking av hesi kapping.

### Ávirkan á Fiskidagaskipan

Saman við restini av vinnuni hava vit eisini gjørt okkara fyri at fáa eina javnvág í tilráðingarnar um fiskiskapin undir Føroyum. Tað hevur verið gjørt við at fáa ráðgeving frá útlendskum serfrøðingum. Hetta hevur verið við til at gera vinnuna føra fyri at seta spurningar til almennu fiskifrøðina, og hevur eisini ávirkað politisku støðutakanina í hesum spurningum.

### Berjast fyri at verja borg

Seinastu árini hava vit havt nóg mikið at verja borg, tí ágangurin móti vunnu rættindunum hjá fiskimonnum hevur verið nærum øgiligur.

Tað fyrsta, vit merkti til hetta, var tá landsstýrið og danska stjórnin gjørdu sínar avtalur um bankabjargingina í 1992 og 1993, har eisini var avtalað ein nærmast oyðilegging av inntøkutrygdini hjá fiskimonnum. Alment var hetta eitt "diktat" frá donsku stjórnini. Men so mikið kom fram aftaná, at tað vóru ikki allir føroyskir politikarar, sum vóru so harmir um at fylgja hesum diktati.

Men hetta vildu vit ikki lata okkum lynda. Eitt var at menn vildu taka trygdina frá fiskimonnum. Men tað, sum kanska var enn verri, var, at hetta skuldi kroystast yvir okkum av einum "útlendskum" valdi. Tað eydnaðist eisini at forpurra hesi ætlan, og sjálvt Nyrup mátti bakka. Tískil hava vit gjørt minst líka nógv sum nakar annar fyri at varðveita føroyskan sjálvsavgerðarrætt í serføroyskum málum!

Nakað tað sama hendi fyri tveimum árum síðani, tá danskir myndugleikar meira ella minni eftir "bílegging" úr Føroyum vildu leggja seg út í skattaskipanina hjá fiskimonnum. Her kunnu vit bert minnast TV2-málið. Men tað fingu vit eisini rikið aftur og eiga æruna fyri, at tað ikki kvettir úr t.d. Dansk Folkeparti um innanhýsis føroysk viðurskifti.

Tað allarseinasta er, at nú eru føroyskir myndugleikar og enntá Arbeiðsgevarafelagið farið at leggja eftir fiskimonnum á einum sera ivasomum

FFblaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA


grundarlagi, men her vilja vit eisini vera á varðhaldi.

### Blaðútgáva

Ein týðandi partur í okkara stríði fyri fiskimenn er FF-blaðið. Tað var longu í 1920, at felagið kom eftir, at tað hevði týdning at hava eitt málgagn, og tá sá FF-blaðið dagsins ljós fyrstu ferð. Tað kom út eina ferð um vikuna heilt fram til 1928, tá tað steðgaði upp av innanfelags ósemju. Men tá hugsað verður um útgerðina tá, so var henda útgáva eitt bragd.

Enn í 2006 mugu vit ásanna, at tað hevur týdning at hava eitt málgagn. FF-blaðið er nú komið út regluliga 2. hvørja viku í 16 ár. Roynt hevur verið at fáa eitt blað við tilfari, sum eisini kann hava áhuga uttanfyri okkara egna limaskara. Og tey eru nógv, sum siga okkum frá, at tey halda blaðið vera sera áhugavert. Ikki minst, tí vit hava kunnað borið siðmenningarligt tilfar, sum onnur bløð ikki hava. Vit halda eisini, at blaðið ger sítt til, at FF hevur eitt gott umdømi millum "vanlig" fólk. Tey eru nógv, sum siga FF-blaðið vera besta blaðið í landinum. At blaðið ikki er væl umtókt av almennu myndugleikunum hevur sína orsøk, nevniliga at blaðið torir at "tosa Roma mitt imot".

Tað er eisini eydnast við blaðnum at fáa sett samleikan hjá fiskimonnum á prent. Hetta er m.a. gjørt við samrøðum við upp til 100 ára gamlar fiskimenn og eisini fiskimannakonur, sum hava upplivað eina heilt aðra tíð enn hana, vit hava í dag. Tað eru tey, sum hava lagt grundarlagið, og hetta hava teir gjørt við at seta lívið í vanda á ein heilt annan hátt enn í dag.

### Mugu ikki gloyma grundarlagið

Tað er klárt, at sera nógv er broytt í virkseminum hjá FF øll hesi árini. Vit hava roynt at ávirka fiskivinnupolitikkin í síni heild. Vit hava roynt at ávirka samfelagsmenningina, eins og vit hava roynt at verja rættartrygdina hjá fiskimonnum og borgarunum annars. At tað hevur gingist misjavnt við hesum er ein onnur søk.

Serliga sárt er tað at síggja, hvussu illa statt tað er við rættartrygdini, samstundis sum eingin í samfelagnum hevur áhuga fyri, at greiðar rættarreglur verða miðvíst brotnar mótvegis fiskimonnum og borgarum.

Nú 95 ár eru liðin, síðan FF varð stovnað, eiga vit at minnast til teir, sum løgdu grundarlagið. Teirra stríð og strev hevur skapt grundarlagið fyri tað, sum hóast alt er nátt. Tað eru tó altíð nýggj mál, sum skulu náast, og í dag eru tað limir felagsins, sum eru grundarlagið fyri framtíðar virksemi. Tí hevur tað týdning, at teir eru vaknir og virknir, so skútan kann haldast á rættari kós.

Við hesum orðum verður takkað fyri hesi 95 árini.

*Óli Jacobsen*

## *Føroya Fiskimaður.*

NEYVAN prestahond á høvdið fingið,
stendur unglingi á sjóarstrond,
litur út ímóti sjónarringi —
handan liggja heimsins stóru lond.
Døggin perlar blonk á grønum lyngi,
kring um fjall er vovin mjørkarond.
Aldan flæðir upp um gjar og tara. —
Skip á firði seta segl og fara.

Hesi før á Suðurlandið stevna,
hagar heldur toskatorvan leið.
Havsins másar vilja vit tey nevna,
vesalingafar sum glæstriskeið;
um at nógv før fyri fok og fei,
spratt allmikið upp av teirra møði,
bæði gróðralíkindi og grøði.

Ungur kennir seg um hjartað orna,
fegin fór hann hetta ár avstað,
eygu glógva meðan kinnar roðna
hendan bjarta vársins fyrsta dag.
Hansar dreymar verða brátt at sodna,
verða eitt við hansar kensludrag.
Havsins ráka hevur piltur sogið;
tí er alduborið hugaflogið.

Bygd er vorðin tóm, tá skip er farið,
longsil leggur skugga yvir tún;
situr tøgn á brík og hagagarði,
ristir sína álvarstungu rún. —
Men tá heyst er komið — alt er aftur,
tá, fyrst tá er hugur vorðin lættur.

Vandaferð og ótti, tað er lagið,
og tí verður mannsins lyndi hart.
Sterkt og álvarstungt er havsins kvæði;
hann ið hoyrir tað fær eygað bjart,
og á sjálvum sær hann hevur ræði,
vónar, um enn alt er sløkt og svart,
lítur út í nátt og ódnareldu, —
dregur í seg havsins rákar køldu.

Hav og klettar, tað er okkar vera,
tað er okkar dráttur nátt sum dag.
Hvar vit eru staddir, hvat vit gera,
er tað okkar sál og kensludrag.
Før, sum gjøgnum havsins íður skera,
føra fong til hetta bygdarlag. —
Grønlands jøkul, Suðurlandsins vandi
hevur føyrað menn á hesum landi.

Neyvan pilturin er vorðin maður,
áður hann sum aðrir fer um borð;
heilsar móður blítt, men ikki glaður, —
tá ímillum teirra falla orð:
«Bið til Harran, sonurin, hann ræður,
gevur okkum altíð bestu kor.»
Eygu hansar vætast, tá hann sigur:
«Jú, tú veitst, eg geri sum tú biður.»

Døggin perlar blonk á grønum lyngi,
kring um fjall er vovin mjørkarond.
Havið dregur, havið hevur fingið.
Nú fer sonurin í onnur lond.
Flaggandi fer skipið út um skora;
veðurbardir ganga innanborða.

Havsins álvar — veldi tess og megi
sýgur inn í fjørð og fram við klett,
leggur skugga eftir mjáum vegi,
breiðir signing yvir mangan blett;
bæði tá tað breyt á ódnardegi,
— tá tað, summarkvøldið, skygdi reytt,
vóru orð tess: «Sigl og brót tær leiðir,
tú, sum í tær drátt av øldu eigir.»

Aldudrátturin er okkar merki,
undir tí vit fylkjast dag um dag;
er enn breyðið bæði turt og berkið,
havið hevur knoðað okkum tað.
Havið er í øllum okkar verki,
okkar hugsan, okkar verulag.
Havsins menn á havsins hørdu strondum
líta út av landi móti londum.

Á Trettanda 1936.

# Grønlandstíðindi

frá Kára við Stein

### 23. oktober

Minus 1,4 stig og stilli. Fyrrverandi "Mikol", svartkalvabáturin úr Manitsok, er her í dag og landar svartkalva, teir hava fulla last. Skipið er í dag heimahoyrandi í Iqaluit og eitur nú "Nunatsiavut Nunuk".

Leygardagin var "Lómur" inni og landaði um 80 tons.

### 24. oktober

- 4,4 stig og stilli. "Polar Natarnaq" kom inn at landa í morgun, teir hava gott 100 tons inni av sekkjarækjum. Túrurin hevur verið stuttur hjá teimum hesaferð.

"Markus" hevur verið í Nuuk og landað nærum fulla last. Teir fóru út seinnapartin nýggjan túr.

Eg gekk mær oman á "Brettið", sum vit kalla tað; har lógu nógvar sildir, sum ein maður seldi. Hann segði mær, at hann hevði keypt sildargørn úr Danmark, og hann hevði sett eitt í síðstu viku og hevði fingið sild hvønn dag, og í gjár fekk hann yvir 100 sildir í. Eg veit ikki, hvat vektin var á sildunum, men eftir eygamáli mundu ganga einar 4-5 til kilo.

### 30. oktober

Minus 5,7 stig og stilli. "Polar Timjarmiut" kom inn at landa í morgun. Tað var ein stuttur túrur hjá teimum; teir hava um 300 tons inni.

"Steffen C" er inni í Manitsok og landar fulla last.

### 31. oktober

- 4,5 stig og stilli. "Polar Timjarmiut" loysti fyrrapartin, og so skjótt teir vóru leysir, legði "Nanok Trawl" til, teir hava gott 300 tons inni.

Í dag tosaði eg við skipparan á "Natarnaq", Dávur Mohr, og hann segði, at teir vóru á síðsta tóvinum. Har er um at vera fult hjá teimum, og so skuldu teir inn til Nuuk í morgin at landa og skifta fólk - og so heim. Dávur Mohr er ein av teimum fáu reyðu monnunum, sum sigla í Grønlandi, hann segði, at hann ætlaði sær í eitt nýtt HB-ball.

Dávur greiddi frá, at teir hava hetta umfarið verið á teimum sunnaru leiðunum og roynt, og fiskiskapurin hevði verið í ordan hjá teimum. Hann greiddi eisini frá, at hann næstan ikki kundi minnast ein so góðan oktobermánaða sum í ár. Tað eru minst 10 ár síðani, ja,



*Manningin av "Akamalik" spælir fótbólt.*

kanska meir, helt Dávur. Hann greiddi eisini frá, at teir høvdu sæð heilt nógva skrift av toski, og onkuntíð var so nógv, at ekkoloddið slerdi dupultan botn. Teir høvdu sæð toskastimarnar á Ravnsbankanum og Danabank, og so greiddi Dávur frá, at temperaturin var ógvuliga høgur. Sum dømi segði hann, at frá 80 favnum og niður á 260 favnar var hitin + 6 stig.

"Akamalik" skal eisini inn til Nuuk at landa og skifta fólk.

### 2. november

Minus 2,4 stig og stilli. "Polar Amaroq" kom inn at landa í morgun, har var alt fult hjá teimum. Teir hava eisini verið inni í Nuuk og millumlandað herfyri. Teir skulu eisini skifta manning, og teir sleppa higani frá í morgin.

### 3. november

- l 3,5 stig og stilli. Eitt følv er komið í nátt, og hann lovar vátakava og regn hetta vikuskiftið. Tað er til at taka, tí tá tá kemur svartfuglurin inn ímóti landi; hann er langt úr landi fyri tíðina, og onkrir bátar hava verið einar 20-30 fjórðingar úr landi fyri at fáa svartfugl. Vit skulu bara hava okkurt kavaælið, so nærkast hann landi.

Fyristøðumaðurin á sjómansheiminum her, Marni Gaard, og eg vóru ein túr í hinari vikuni. Vit mundu vera einar 12-15 fjórðingar úri á, og vit fingu knapt 40 fuglar tann dagin, men tað var nakað gjálvut at skjóta tann dagin. Var veðrið betri, høvdu vit fingið væl meira.

Skeljabáturin "Sonja Kiel" var inni og landaði í dag; teir høvdu gott 20 tons av lidnari vøru. Søgur siga, at prísurin á jákupsskeljum er báðumegin 100 kr. fyri tíðina.

Fyrrverandi "Kiliutaq" nú "Saputi" kom inn í morgun at kanna sveisingarnar afturi við sliskuna. Teir hava júst verið inni í Nuuk og landað 500 tons av svartkalva. Nú, teir eru byrjaðir nýggjan túr, finna teir útav, at skipið lekur afturi við sliskuna. Teir hava verið noyddir at lensað eina ferð um dagin, men nú er versnað so, at teir hava pumpað alla tíðina. Kavari hevur verið niðri, og hann fann fleiri hol á skipinum, og so varð sagt, at tað stóð lítil strála inn av sjógvi av tí eina holinum. Hvat verður gjørt nú, vistu teir ikki at siga enn, men her í býnum var eingin, sum kundi sveisa skipið saman aftur. Teir royna norðuri á 73 stigum.

Seinast "Akamalik" var her og landaði, vóru teir flestu av manningini uppi í ítróttarhøllini og spældu fótbólt. Eg var og kannaði, hvussu gekk hjá teimum. Eisini tók eg nøkur bíløt av teimum. Tað kann ikki sigast annað, at onkur fekk sveittan fram, men hvør vann og ikki, veit eg ikki, men nógv mál vórðu skorað báðar vegir. Teir hildu sjálvir roknskap við málunum, og hvat liðið var fremst í kappingini.

Í fjør veður, tá teir vóru inni og landaðu, vóru teir úti og koyrdu við kavaskutara. Ein avbera góður túrur segðist.

### 4. november

Minus 2,1 stig og lot av suðri við kavaælingi. "Lómur" kom í morgun við um 80 tonsum. Tað er avreiðingarbann fyri tíðina, og sum dømi kunnu vit taka "Lóm", tier skulu inn at hvønn leygardag, og teir skulu ikki loysa aftur fyrr enn mánamorgun aftur. Soleiðis er gjørt fyri allan rækjuflotan her í Sisimiut.

## Pápi Kvívíks Tummas:

# Fingið gravstein í Íslandi aftaná 80 ár


Eli við grøvina hjá abbanum á Hrísey. Ábrabam á Strondum liggur vinstrumegin

Sum kunnugt eru nógvir føroyskir fiskimenn druknaðir undir Íslandi, ta tíðina vit hava havt fiskiskap á hesum leiðum.

Teir allarflestu av hesum hava fingið váta grøv, men nakrir eru jarðaðir í Íslandi. Tað finnast "hópgravir" í Reykjavík við manning á "Onnu" og "Acorn" og á Seyðisfjørðinum við manning á "Riddaranum", sum greitt frá her í blaðnum áður.

Síðan eru einstakar gravir við føroyskum fiskimonnum ymsa staðni í Íslandi, og í hvussu í summum førum verða hesar gravir hildnar.

Herfyri fekk ein slík føroysk grøv gravstein. Í hesi grøv hvílir Theanjardus Thomassen úr Kvívík, og grøvin er á lítlu Hrísey í Eyjafjarðadýpinum á Norðlandinum. Oyggin liggur 20 fjórðingar norðanfyri Akureyri, og er knappar 8 ferkilometur til støddar, og her búgva um 200 fólk.

Thean Jardus var pápi tann kenda skiparan Kvívíks Tummas. Teir vóru við "Rosenhjem" undir Íslandi á sildaveiðu í 1926, og mynstraðu teir 7. juli. Við vóru 19 mans. Hetta kom at gerast ein vanlukkuligur túrur.

Tann fyrsta vanlukkan hendi 14. august. Tá datt 1. bestimaður, Abraham Abrahamsen av Strondum, fyri borð og druknaði. Hann varð fingin aftur og varð jarðaður 20. august á Hrísey. Abraham var um 30 ára gamal og ógiftur. Hann hevði siglt við Tummasi í mong ár. Hansara samband til Kvívíkar var annars, at mamma hansara var haðani.

Tann 9. september rakti annað óhappið "Rosenhjem". Hendan dagin sigldi íslendski trolarin "Jón Forseti" á bátarnar hjá "Rosenhjem". Tríggir mans doyðu, og vóru teir Theanjardus, Hjalmar Joensen av Hvítanesi og Theodor Hansen, kallaður Dor, í Funningsstovu í Havn. Aðrir av manningini fingu skaða, millum hesar var Tummas sjálvur, sum varð illa skaddur, men sum tó kom fyri seg aftur.

Líkið av Jardusi varð fingið aftur, og hann varð jarðaður á Hrísey undir liðini á Abrahami. Einki sást til hinar. Jardus var føddur í 1864, Hjalmar í 1904 og Dor í 1893.

Um sjálvan tilburðin skrivar Dimmalætting nakað so:

Hósdagin 9. september sóu teir á "Rosenhjem", ið lá innanfyri sjómarkið tætt uttanfyri Miðfjørð, ein stóran sildastima. Báðir bátarnir vórðu við tað sama settir út, og teir róðu eftir stimanum. Teir máttu tó gevast at rógva, tí ein trolari kom siglandi við fullari ferð gjøgnum stiman og beint móti bátunum, sum vóru samanfestir. Á bátinum royndu teir at rópa og at gera vart við seg, men einki hjálpti. Trolarin sigldi við 8-9 míla ferð beint á bátarnar. Annar kvettist av og hin hvølvdist. Báðir bátarnir og allir 13 menninir fóru inn undir trolaran, sum nú bakkaði við fullari ferð, og setti tveir bátar út. Teir fingu so bjargað 10 av monnunum á lívi. Theodor Hansen var góður svimjari, men hann hevur kanska fingið skaða av skrúvuni.


Thean Jardus

"Rosenhjem" við restini av manningini lá eina snørislongd frá, og tað hevur verið ein tung løta hjá teimum at síggja henda syrgiliga tilburð uttan at kunna hjálpa.

Bert nakrar dagar seinni sigldi "Jón Forseti" aftur á eitt skip, hesa ferð eitt íslendskt, so ólíkindi munnu hava verið uppi í.

Tummas slapp ikki heim aftur við skipinum, og skipari heim var Hans Hansen í Funningsstovu og bestimaður var Dánjal Olsen, kallaður Eiðis Dánjal.

### Endaði á havsins botni

Kvívíkar Tummas kom so væl fyri seg aftur, at hann 16. november fer við "Rosenhjem" til Keypmannahavn við eini klippfiskalast. Teir fingu illveður, "Rosenhjem" fer at leka, og móti midnátt 26. november var so nógvur sjógvur í henni, at teir fóru í bátin og róðu til Lerwick. Teir komu heim 5. desember við einum enskum trolara.

"Rosenhjem" varð bygd í 1910 í Rosendal í Noregi. Hon var 122 nettotons, hevði 3 mastrar og 48 hk Vølund motor. Hon varð keypt til Føroyar í 1923 av Tummasi og Hans Petersen.

### Grøvin fingið stein

Nú koma vit aftur til Theanjardus. Nú 80 ár eftir hesa hendingar, tann 14. september, hevur grøvin hjá honum fingið stein. Tann, sum hevur gjørt steinin, er langabbasonurin, Magnus Petersen, sum fyrr var advokatur, men nú er "grótmaður". Abbasonurin, Eli Petersen, sum er fostursonur Tummas, fór yvir til Íslands og fekk steinin settan upp.

Tískil hava vit nú enn eitt sjónligt minni um okkara forfedrar, sum settu lívið til undir Íslandi, og eiga teir báðir takk fyri tað.

### Manningin vanlukkutúrin var:

Thomas Thomassen, skipari, Kvívík
Ábraham Abrahamsen, bestimaður, Strendur
Jákup Andreassen, bestimaður, Vík
Ísak Joensen, motorpassari, Sørvági
Jóhannes Bechstrøm, kokkur, Tórshavn
Theanjardus Thomassen, Kvívík
Djóni Thomassen, Kvívík
Hans Jákup Joensen, Svínáir
Jógvan Michael Thorsvig, Hósvík
Kristian Olsen, Hósvík
Hjalmar Joensen, Hvítanes
Dánjal Olsen, Eiði
Poul Johannes Poulsen, Eiði
Jóannes Jacobsen (á Skúr), Nólsoy
Poul Edward Ejde, Nólsoy
Petur Lindenskov, Tórshavn
Petur Simonsen, Tórshavn
Hans Hansen, í Funningsstovu, Tórshavn
Theodor Hansen, beiggi Hans.

Kristian Olsen var sóknar- og sýsluformaður í Føroya Fiskimannafelag í mong ár.


Haja og Kvívíks Tummas


Hrísey har Jardus liggur grivin


Eli inni á skrivstovu FFs

Maskinistur | Maskinmeistari | Skipari | Skipsførari

# Spennandi útbúgvingar

## - eitt hav av vinnumøguleikum

**Nýtt skúlaár byrjar 3. januar 2007**



### Maskinmeistari

Maskinmeistaraútbúgvingin er mest fjølbroytta og hægsta tekniska yrkisútbúgving, sum kann takast í Føroyum. Útbúgvingin gevur sera stórar møguleikar bæði á sjógvi og landi, líka mikið um tað er í Føroyum ella úti í heimi. Maskinmeistaraútbúgvingin gevur eisini møguleikar fyri at blíva elinnleggjari. Eisini í oljuvinnuni eru maskinmeistarar størsti einstaki yrkisbólkurin. Útbúgvingin tekur 3 ár.

Upptøka til maskinmeistaraútbúgvingina er tvær ferðir um árið. Byrjar aftur í januar 2007.

### Maskinistur

Maskinistútbúgvingin gevur møguleikar fyri at vera maskinstjóri á flestu veiðuførum, sum fiska á føroyskum sjóøki. Útbúgvingin gevur t.d. eisini rætt til at vera maskinstjóri á skipum við maskinorku upp til 3000 kW í altjóða sigling. Útbúgvingin tekur 9 mðr.

Upptøka til maskinistútbúgvingina er eina ferð um árið og byrjar aftur í august 2007.

### Skipari

Vinnuháskúlin bjóðar altjóða góðkendar útbúgvingar til skipara og skipsførara, sum geva vinnumøguleikar á sjógvi og landi um allan heim. Sum skipari kanst tú føra øll fiskiskip um allan heim, eins og farmaskip upp til 3.000 tons.

Skiparaútbúgvingin tekur hálvtannað ár. Tá ið tú hevur staðið skipara, kanst tú fara beinleiðis til skipsførara.

### Skipsførari

Skipsføraraútbúgvingin tekur tilsamans 3 ár. 3 hálvár til skipara og síðani 3 hálvár til skipsførara. Sum skipsførari kanst tú føra øll skip á øllum høvum.

Upptøka til skipara- og skipsføraraútbúgvingarnar er tvær ferðir um árið og byrjar aftur í januar 2007.

Maskinist- og maskinmeistara-, skipara og skipsføraraútbúgvingarnar eru moduluppbygdar.

Hevur tú hug at gerast maskinistur, maskinmeistari, skipari ella skipsførari? Set teg í samband við skúlan, so senda vit tær upplýsingar um upptøkutreytir og lesturin saman við umsóknarblaði.

Vinnuháskúlin er ein nútímans skúli við serkønum lærarum í øllum lærugreinum, eins og skúlin hevur allar teir hentleikar og útbúnað, sum skulu til fyri at gera útbúgvingina áhugaverda og góða. Útbúgvingarnar á Vinnuháskúlanum eru góðkendar av Føroya Landsstýri, Søfartsstýrelsen og IMO.

**VINNUHÁSKÚLIN**
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

Postboks 104 · FO-110 Tórshavn · Tel 350 250 · Faks 350 251 · vh@vh.fo · www.vh.fo

KREA.FO · TEL 47 80 80

---

Maskinistur | Maskinmeistari | Skipari | Skipsførari

# Maskinistútbúgving

## fyri handverkarar við siglingarroyndum



Hevur tú royndir sum maskinmaður, men ikki prógv, so er møguleikin nú at fáa prógv sum maskinistur við rætti til at fáa sjóvinnubræv sum maskinstjóri og 1. meistari á skipum, har framtøkumegin er upp til 2.999 kW.

**Útbúgvingin er ætlað teimum sum hava:**

- Innanfyri seinastu 5 árini siglt sum einsamallur meistari ella 1. meistari á skipum við framdrívsmegi á minst 750 kW.
- Góðkenda handverksútbúgving.

**Mannagongd:**

Umsøkjarin skal til samrøðu á Vinnuháskúlanum. Samrøðan snýr seg um gjøgnumgongd av tínum arbeiðsroyndum og vitan við tí endamáli at finna eitt grundarlag og góðkenning av tínum fakligu kvalifikatiónum fyri at fáa "merit" (Avriksflutningur).

Eftir samrøðuna verður ein útbúgvingarætlan gjørd, sum umsøkjarin skal fylgja.

Av tí, at henda útbúgving helst ikki verður ein afturvendandi møguleiki, er alneyðugt, at tú søkir um upptøku beinanvegin.

Umsóknirnar skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi tann 15. november 2006.

Vinnuháskúlin er ein nútímans skúli við serkønum lærarum í øllum lærugreinum, eins og skúlin hevur allar teir hentleikar og útbúnað, sum skulu til fyri at gera útbúgvingina áhugaverda og góða. Útbúgvingarnar á Vinnuháskúlanum eru góðkendar av Føroya Landsstýri, Søfartsstýrelsen og IMO.

**VINNUHÁSKÚLIN**
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

Postboks 104 · FO-110 Tórshavn · Tel 350 250 · Faks 350 251 · vh@vh.fo · www.vh.fo

KREA.FO · TEL 47 80 80

FFblaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
Vit átaka okkum at gera lýsingar fyri virkir og einstaklingar uttan meirkostnað fyri lýsaran
Her fært tú bestu lýsingaravtaluna • Blaðið verður sent øllum skipsmanningum
Lýsingar
Tlf: 311569




Hjá læknanum:
- Tú kanst ikki halda áfram við at drekka so illa Jógvan. Blóðroyndirnar hjá tær fordampa áðrenn tær náa yvir á laboratoriið.

*****

Í rættinum:
Dómarin: - Ert tú straffaður áður?
Ákærdi: - Ja, vermóðir hevur búð hjá mær alt summarið.

*****

Á bókasavninum:
- Hava tit nakra bøkur um barnauppaling?
- Nei, tíverri.
- Í lagi meðni, so taki eg hesa um sjálvsverju.

*****

Hvat ger ein eiturkoppur tá hann keðir seg?
Han fer út á netið at surfa!

*****

Ein fín matstova er eitt stað, har máltíðin er lítil, men rokningin er stór.

*****

- Tú Hanus, eg havi ikki tosað við konuna í tríggjar mánaðir.
- Bara róligt Karl, fyrr ella seinni tigur hon, so tú fært sagt okkurt.

*****

- Tá konan hjá mær var ung, var hon so deilig at eg kundi eti hana. Nú angri eg bara at eg ikki gjørdi tað.



# Hjørdis Háberg 90 ár

Mánadagin tann 13. november verður merkiskvinnan Hjørdis Háberg 90 ár.

Foreldrini hjá Hjørdis vóru Jógvan Næsaa, sum var ættaður innan av Nesi í Eysturoynni, og Elisabeth, sum var ættað úr Sumba. Tey búsettust í Havn, og tí er Hjørdis havnarfólk burturav.

Hon er eisini eitt av teimum havnarfólkum, sum veit mest um ta gomlu Havnina. Hetta fer eisini at koma til sjóndar sjálvan føðingardagin, tá bók um Hjørdis fer at verða løgd fram. Her greiðir Hjørdis frá sínum uppruna og sínum ungdómi í Havn. Ein partur av bókini er eisini tað, sum Hjørdis hevur skrivað niður um húsini í Havn, tá hon var ung. Hjá teimum, sum hava áhuga fyri hesum, er hetta spennandi lesnaður. Tað sigur eisini nakað um einastandandi minni, og tað er ein sera stórur fongur, at slík minni verða fest á blað, áðrenn tað verður ov seint.

Tá Hjørdis fylti 85 ár, høvdu vit hennara ættarsøgu aftur til Blankskála. Henda frásøgnin sæst á okkara heimasíðu blað nr. 257.

## Omman burturflutt

Ein áhugaverdur partur av hesi frásøgn er, tá abbi hennara, Jørgen á Nesi, burturflutti ommuna, og er frásøgnin hjá Hjørdis henda:

*Omma æt Katrina Sofía og var norðan av Syðradali. Foreldur hennara vóru av Blankaskála. Tey fluttu til Syðradals, tá tað var omanlop á Blankskála í 1809, so har hevur eingin búð síðan. Omma var bóndadóttir og abbi var "bara" vanligur fiskimaður, so foreldur hennara vildu ikki, at hon skuldi giftast við honum. Abbi hevði tríggjar systrar, sum vóru giftar har norðuri á Kalsoynni, og var hann ofta har norðuri og vitjaði systrarnar. So onkuntíð, tá hann hevur verið har norðuri, hava tey nokk avtalað, nær hann skuldi koma eftir henni. Telefon var jú eingin. Hann fór so við róðrarbáti eina nátt norður. Hon tænti tá hjá prestinum á Viðareiði, so hann mátti heilt norður til Viðareiðis eftir henni. Onkur vildi vera við, at prestur hjálpti henni, so har stóð hon klár á lendingini við eini kistu, har hon hevði øll síni ting í.*

Hesa kistu hevur Hjørdis standandi í køkinum. Tá avtornaði varð giftarmálið góðkent, og Jørgen vísti seg at vera ein rættiligur brandur!

## Giftist við røttum geilarmanni

Sum heilt ung rann saman millum Hjørdis og Petur. Hann var sonur Pola skómakaran og Mallu. Malla var av Geilarættini í Havn, systkinabarn Kristin í Geil, og Petur var "rættur geilarmaður" við teimum evnum og stríðshugi, sum var eyðkent fyri geilarmenn. Petur var eisini brennandi tjóðskaparmaður. Tá hann og Hjørdis skuldu giftast, vildu tey sleppa undan at verða gift "á donskum", sum tá framvegis var galdandi fyri borgarliga vígslu. Petur legði til brots fyri at verða giftur eftir føroyskum borgarligum víilsisrituali. Tað vóru nógvir bágar á vegnum. Men tá avtornaði gjørdust tey bæði tey seinastu, sum giftust eftir tí danska ritualinum! Hendan søgan er eisini við í bókini, sum vit fara at koma aftur til, tá hon er komin út.

## Eitt rættiligt heim

Sagt verður ofta, at aftanfyri einhvønn mann stendur ein kvinna. Hetta hevur ikki minst verið galdandi fyri Petur og Hjørdis. Ein maður við so nógvum virksemi sum Petur, hevði brúk fyri einum stabilum baklandi, sum kundi vera trygd fyri, at jørðforbindilsið ongantíð varð slept. Og við sínum stillføra og vinarliga sinnalagi var Hjørdis tann besta trygdin fyri, at hetta ikki hendi. Teirra heim var í orðsins besta týdningi eitt heim. Her kom altíð ein hópur av fólki, sum øll føldu seg eins væl. Tað verður enn tikið til av bygdafólki, sum komu ung til Havnar, hvussu tey høvdu heimið hjá Petur og Hjørdis sum eitt frístað, har tey altíð føldu seg vælkomnan. Eitt gott dømi um hetta er Zacharias Zachariassen, sum kom ungur til Havnar. Nú er tað eisini hansara forlag Leirkerið, sum gevur bókina hjá Hjørdis út.

Har var eisini vítt til veggja. Mamman búði inni, til hon doyði, og systirin Rikka búði eisini hjá Hjørdis og Peturi stóran part av lívinum. Heimið hjá Hjørdis er ikki minni savningarstað í dag, nú ommubørn- og langommubørn rættiliga eru farin at fjølgast. Tey kenna als ikki langommuna sum eina gamla konu. Eitt av langommubørnunum spurdi einaferð, hvør var eldri omman ella langomman! Hetta eru eisini royndirnar hjá okkum øðrum. Hjørdis hevur somu evni at samskifta við gomul og ung. Og tað, sum sermerkir hana, er hennara positiva lívssýni, sum merkir, at hon altíð er við tí góða orðinum.

Okkara samband stavar frá, at Petur var mammubeiggi mín. Vit búðu í Norðragøtu, har umstøðurnar vóru nógv øðrvísi enn í Havn, eisini fíggjarliga. Tá var tað ein stórhending at fáa føðingardags- og jólagávur sendar frá mammubeiggjunum í Havn!

Ikki minst var tað stórhending at kunna koma til Havnar at ferðast. Í Gøtu var andaliga umhvørvið sera konservativt, meðan tey vóru meira frísinnað í Havn. M.a. var møguligt at lesa Anders And inni hjá teimum hjá Hjørdis. Hetta var "forboðin frukt" í Gøtu! Blíðskapurin var eisini framúr, og tann vælvild, sum verður víst børnum, verður ikki gloymd.

Petur doyði í 1994. Tá tók Hjørdis yvir sum stjóri á p/f Hvalnes og røkti hon hetta væl og virðiliga til hon táttaði í 80. Hon er ikki fyrsti kvinnuligi reiðarin í Føroyum, men ein av teimum heilt fáu.

Hjørdis hevur eisini varðveitt vinalagið við ættina hjá Petur, og er hetta eisini ført yvir til yngru ættarliðini, sum hon kundi verið bæði omma og langomma til.

Børnini eru Beinta, Erna, Jógvan Páll, Elma, Pætur og Malan. Ommubørnini er 20 í tali og langommubørnini eru í skrivandi stund 11 við útliti fyri 12 sjálvan føðingardagin.

Hjørdis er nú vorðin eitt sindur blind, eitt sindur deyv og eitt sindur "hølt". Men høvdinum bilar einki. Aftaná føðingardagin fer hon á Ellisheimið í Havn. Tey hava nakað at gleða seg til!

Góða Hjørdis. Hjartaliga tillukku við teimum 90 árunum við tøkk fyri alt, vit hava havt saman!

*ó.*




*Hjørdis fær sína egnu bók føðingardagin*